# Starvsblaðið

Ársrit / 2023-2024

AÐALFUNDURIN, MARS 2024



## SÚNI TEKUR SEINASTA TØRN SUM FORMAÐUR

TEMA Í hernað móti happing

s. 6

Førleikamenning

Ein vegur til tryggari starv og hægri løn

s. 24




54 Starvsfelagið verður grønari

24 Førleika-menning

34 Arbeiðspláss-vitjanir

46 Starvsfelagið í samhugaverkfalli

40 Tiltak á Reinsarínum

TEMA
6 Í hernað móti happing


## Kunning frá felagnum

**Limir, ið einki álitisfólk hava** á deildini/arbeiðsplássinum, verða bidnir um at venda sær til felagið og upplýsa teldupost sín, so tit fáa kunning frá felagnum.

Hetta er eisini galdandi fyri aðrar limir, sum ynskja at fáa kunning frá felagnum.


ÚTGEVARI:
**Starvsfelagið ©**
J. H. Schrøtersgøta 9
Postsmoga 165
110 Tórshavn
Telefon 61 48 68
T-postur: starvsfelag@starvsfelag.fo
Heimasíða: www.starvsfelag.fo

SKRIVSTOVUTÍÐ:
Mánadag–hósdag kl. 09.00-1600
Fríggjadag kl. 09.00-15.00

TELEFONTÍÐ: kl. 10.00 – 15.00
*Tó ikki mikudag*

NEVND:
Súni Selfoss, formaður
Birita Fritleifsdóttir Kjærbæk, næstforkvinna
Borgný Mohr
Hildigerð Djurhuus
Hergeir Staksberg

FELAGSSKRIVARI:
Anna D. Johannesen

SAMSKIPARI:
Guðrið Joensen

SAMSKIFTISFÓLK:
Beinta Simonsen

TRYGGINGARRÁÐGEVI:
Jákup Danielsen

SOSIALRÁÐGEVI:
Leif Olsen

Starvsfelagið er limur í norðurlendsku felagsskapunum NTR, NSO og altjóða felagsskapinum ISKA

STARVSBLAÐIÐ:
Blaðið verður sent limum felagsins ókeypis. Loyvt er at endurgeva tilfar ella partar av tilfari (myndir undantiknar) treytað av, at keldan verður upplýst.

RITSTJÓRN:
Beinta Simonsen
Nevndin (ábyrgd)

RÆTTLESTUR:
Erla Berghamar

MYNDIR:
Jens Kristian Vang

UMBRÓTING, SNIÐGEVING, PRENT OG LIÐUGGERÐ:
Føroyaprent

FORSÍÐA:
Súni Selfoss
Mynd: Jens Kristian Vang

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705






# Tvær ørkymlandi kanningar

**Starvsfelagið gjørdi í fjør tvær kanningar, sum avdúkaðu ivasom viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum, og sum ivaleyst fara at merkja arbeiðið, sum liggur fyri framman hjá felagnum**



**OKKURT ER SPINNANDI GALIÐ** á føroyskum arbeiðsplássum. Við arbeiðsmentanini og við virðingini fyri starvsfólkum og týðandi avtalum, sum vit hava gjørt við okkara sáttmálapartar.

Tað kundi verið yvirskiftin, tá ið eg skal taka saman um niðurstøðurnar av tveimum týðandi kanningum, sum Starvsfelagið gjørdi í farna ári. Tann fyrra ein limakanning um happing. Tann seinna ein kanning millum limir á almenna og kommunala økinum um, hvussu avtalurnar um førleikamenning og eftirútbúgving av starvsfólki virka í verki.

Í báðum førum vóru niðurstøðurnar lítið hugaligur lesnaður, og tær geva okkum veruliga nakað at hugsa um og arbeiða víðari við í komandi tíðum.

**TAÐ VAR Í SUMMAR**, at Starvsfelagið gjørdi fyrstu kanningina, sum nakrantíð er gjørd av happing millum vaksin fólk á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Vit vistu tað ikki, tí at evnið er so merkt av tabu, skomm og tøgn. Men tá ið niðurstøðan kom, ruddaði hon allan iva burtur og váttaði óunniliga mistankan, vit høvdu havt: Fimti hvør limur í felagnum segði seg hava verið fyri happing á arbeiðsplássinum.

Høg tøl. Skelkandi høg.

– Tað er ikki vert at seta lív og heilsu í váða fyri arbeiðsplássið, sigur ein, sum hoyknaði undir trýstinum. Í hesum ársritinum varpa vit ljós á grima skortin hjá happingini: Søgur um ljótan atburð, niðrandi viðmerkingar, grátandi starvsfólk, útihýsan og eitrandi arbeiðsmoral. Um starvsfólk, sum happa hvørt annað. Um leiðslur, sum taka lut í leikinum ella venda blinda eygað til. Um orsøkirnar til happingina, og um teir álvarsomu likamligu og sálarligu løstir, ið standast av henni.

Eg fegnist um, at vit sum felag hava fingið sett hetta eyma álvarsmálið á dagsskránna. At vit eru farin í hernað ímóti hesi ósunnu og spillandi arbeiðsmentan og arbeiðsumhvørvi, sum oyðileggur menniskju. Gleðiligt er tað eisini, at síðani kanningin kom, hava fleiri vent sær til felagið, bæði limir, ið kenna trupulleikan, og stovnsleiðslur, ið taka trupulleikan í álvara og eisini eru í samskifti við avvarðandi sáttmálapartar um hetta málið.

Tó eitt hjartasuff. Tað er Arbeiðs- og Brunaeftirlitið, sum er eftirlitsmyndugleiki á økinum. Fyri okkum sum felag er tað altumráðandi, at eftirlitsmyndugleikin er sjónligur, virkin og til at fáa samband við í hesum máli. Og tí hevur tað verið eitt satt vónbrot, at vit higartil bert eru møtt við tøgn frá eftirlitsstovninum í hesum álvarsmáli. Tað er átaluvert. Men eingin ivi skal vera um, at okkara arbeiði heldur fram ótarnað. Tøgnin er brotin, og felagið helmar ikki í, fyrr enn vit fáa


**framhald ///**


> „Og tí hevur tað verið eitt satt vónbrot, at vit higartil bert eru møtt við tøgn frá eftirlitsstovninum í hesum álvarsmáli. Tað er átaluvert."

# ODDAGREIN

„Okkurt er spinnandi galið á føroyskum arbeiðsplássum.“

um rótina av hesum stóra vandamáli á okkara arbeiðsplássum.

**ØRKYMLANDI VAR** eisini at síggja úrtslitið av kanningini, sum felagið gjørdi í heyst um, hvussu avtalurnar um strategiska og skipaða førleikamenning á almennum arbeiðsplássum virka. Her svaraði bróðurparturin av spurdu limunum, sum starvast eftir sáttmálunum við Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, at tey ikki kenna til slíkar avtalur yvirhøvur. Meiri enn annarhvør svaraði, at eingin førleikamenning er á teirra arbeiðsplássum, og útvið helmingurin segði, at tey hava ongantíð verið til nakra starvsfólkasamrøðu um, hvussu tey kunnu mennast fakliga; hóast sáttmálin greitt sigur, at starvsfólkasamrøður skulu haldast. Eina ferð um árið.

Hetta er eitt álvarsmál, sum vit umrøddu á álitisfólkafundi í heyst, har umboð fyri sáttmálapartarnir vóru umboðað. Hetta er eisini eitt mál, vit varpa ljós á í ársritinum hesa ferð.

Avtalurnar um førleikamenning eru partar av sáttmálunum við ávikavist Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið – og tær skulu haldast. Leiðslurnar á teimum almennu arbeiðsplássunum hava leiðslurættin, og áliggur tað harvið fyrst og fremst teimum at seta avtalurnar í verk. Men starvsfólkini sjálvi skulu eisini vera við til at fáa avtalurnar at virka. Og tí eiga okkara álitisfólk at halda eyga við og eggja til, at avtalurnar fáast at virka úti á arbeiðsplássunum, samstundis sum felagið hevur áhaldandi samskifti við sáttmálapartarnar um at fáa leiðslurnar at átaka sær sínar sáttmálaskyldur.

Tað hevur stóran týdning fyri almennu arbeiðsplássini, at tey hava starvsfólk, sum støðugt eru væl fyri fakliga og kunnu flyta arbeiðsplássini framá. Hinvegin hevur tað eisini stóran týdning, at starvsfólkini sleppa at menna seg fakliga, so at tey standa seg væl á arbeiðsmarknaðinum. At tey fáa førleikar, ið geva størri ábyrgd og hægri løn, og at tey ikki minst verða brynjað at loysa nýggjar uppgávur á einum nútímans og talgildum arbeiðsmarknaði, sum setur størri og størri krøv til umstilling.

**UM STUTTA TÍÐ** verður aðalfundur aftur í Starvsfelagnum, sum eg vóni fer at góðkenna meg sum formann í felagnum eitt valskeið afturat. Átta gevandi, krevjandi og spennandi ár havi eg stjórnað felagnum, og nú eri eg spentur og fúsur at fara undir nýggjar uppgávur fýra tey seinastu, sum so verða míni síðstu sum formaður.

Eingin ivi er um, at tey bæði omanfyri nevndu málini fara at standa á arbeiðskalendaranum hjá felagnum í komandi tíðum. Saman við øðrum átrokandi málum, sum til dømis arbeiði við at dagføra lønartalvuna og 37 tíma arbeiðsviku.

2024 er eisini eitt samráðingarár, tí 1. oktobur ganga bæði sáttmálin við Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag út, og 1. januar 2025 ganga allir tríggir sáttmálarnir, vit hava við Føroya Arbeiðsgevarafelag, út.

Við hesum fari eg at ynskja øllum limum vælkomnum á aðalfund hjá Starvsfelagnum leygardagin 9. mars.

***Góðan aðalfund!***

*Súni Selfoss, formaður*





**Tilmelding:** Seinasta freist at melda seg til veitsluna er fríggjadagin 1. mars á gudrid@starvsfelag.fo ella tlf 614868

# VÆLKOMIN Á AÐALFUND

## – og til veitslu, grill og felagssang

Vit gera borðplan eftir arbeiðsplássi



## 9. mars

### 15.00 AÐALFUNDUR

- Formansfrágreiðing
- Ársins álitisfólk verður valt
- Gestarøðarar:
  Rita C. Bundgaard, forkvinna í HK Stat og samráðingarleiðari
  Uni Holm Johannesen, samfelagsfrøðingur og løgtingslimur
- Góðkenning av roknskapi
- Møguligar lógarbroytingar
- Møgulig uppskot frá limum og nevnd
- Møgulig ásetan av limagjaldi
- Val av forfólki
- Val av grannskoðara og tiltakslimi
- Ymiskt

### 18.00 VÆLKOMUDRYKKUR OG TÓNLEIKUR

- Kim Hansen spælir



### 19.00 ÓKEYPIS VEITSLA VIÐ GRILL OG FELAGSSANGI

- Ørvaroddar grilla vælsmakkandi grís við øllum góðum afturvið
- Omaná frá sp/f Oddvør Skarðhamar
- Kim Hansen spælir undir borðhaldinum
- Tónleikainnsløg frá Eyðun Nolsøe, Danny Baldursson, ABBA við Edith og Allan
- Drigið verður um eitt gávukort á 1000kr frá Atlantic Airways og uppihald í summarhúsinum í Skálavík



# Í HERNAÐ MÓTI HAPPING

Tekstur: **Jákup Bogi Joensen**
Mynd: **Jens Kristian Vang**

**Tað er okkurt spinnandi galið við mentanini á føroyskum arbeiðsplássum. Tað heldur formaðurin í Starvsfelagnum, nú stór kanning hjá felagnum vísir, at fimti hvør limur hevur verið fyri happing á arbeiðsplássinum. Felagið vil av við happingina og hartar myndugleikan, ið skal hava eftirlit á økinum**

– TAÐ ER BÆÐI skelkandi og ræðandi, at tølini eru so stór og støðan so vánalig á føroyskum arbeiðsplássum. Tað kunnu vit als ikki góðtaka, og tí taka vit sum fakfelag trupulleikan í allarstørsta álvara.

Tað sigur Súni Selfoss, formaður í Starvsfelagnum.

Hann sipar til kanningina um happing, sum Starvsfelagið hevur latið gera. Kanningin vísir, at 20 prosent av teimum spurdu, ella fimti hvør limur hjá Starvsfelagnum á sáttmálaøkjum undir Fíggjarmálaráðnum, Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum og Føroya

framhald ///



„Tað er bæði skelkandi og ræðandi, at tølini eru so stór og støðan so vánalig á føroyskum arbeiðsplássum..“



## FAKTA:

**Kanningin um happing á arbeiðsplássum er grundað á svar frá limum í Starvsfelagnum.**

Tað er Gallup Føroyar, sum hevur gjørt kanningina fyri Starvsfelagið. Kanningin varð gjørd í tíðarskeiðnum frá 7. juli til 23. september 2023.

Sambært kanningini hava 20 prosent av teimum, sum svaraðu, ella fimti hvør limur hjá Starvsfelagnum, upplivað happing á núverandi arbeiðsplássi seinastu 12 mánaðirnar.

Kanningin vísir, at happing fer mest fram millum starvsfelagar, men starvsfólk kenna seg eisini happað av leiðsluni á arbeiðsplássinum og av nærmasta leiðaranum.

Tilsamans 1.604 limir eru spurdir í kanningini, harav hava 657 svarað. Tað svarar til 41% av teimum spurdu, og tey hoyra til hesi sáttmálaøki:

- 63% til Fíggjarmálaráðið
- 28% til Kommunala Arbeiðsgevarafelagið
- 9% til Føroya Arbeiðsgevarafelag

Øll kanningin og úrslitini eru at finna á heimasíðuni starvsfelag.fo



Arbeiðsgevarafelag, hava verið fyri happing á arbeiðsplássinum seinastu 12 mánaðirnar.

Sammett við onnur lond rundan um okkum er talið ógvuliga stórt. Í líknandi kanning í Danmark siga 7, 8 prosent av teimum spurdu seg hava verið fyri happing seinasta árið.

At tølini í Føroyum eru so vánalig og víkja so nógv frá tølunum aðrastaðni eigur at fáa ávaringarlúðrarnar at ýla, heldur formaðurin í Starvsfelagnum.

– Tølini geva okkum greiðar ábendingar um, at okkurt er spinnandi galið við mentanini á føroyskum arbeiðsplássum. Talan er eftir øllum at døma um eina ógvuliga ósunna mentan og eitt arbeiðsumhvørvi, sum eingin kann liva við. Og tað eiga vit at gera nakað við beinanvegin, sigur Súni Selfoss.

Hann vísir á, at fleiri limir hava vent sær til Starvsfelagið við søgum um happing á arbeiðsplássinum, eftir at kanningin var almannakunngjørd í heyst.

Tí vónar hann, at Starvsfelagið við kanningini fær brotið tøgnina og varpað ljós á trupulleikan við happing.

– Kanningin staðfestir, at tað eru ikki tey fáu, sum eru fyri happing á føroyskum arbeiðsplássum, men ein rúgva av fólki. Tí skylda vit okkara limum og føroyska løntakaranum at rudda upp í óskilinum og tryggja eitt sunt og gott arbeiðsumhvørvi, sigur Súni Selfoss.

### Fylgja kanningini upp

Við kanningini hevur tað eydnast Starvsfelagnum at seta happing á breddan.

Eftir at úrslitini vóru almenn í heyst, hevur Starvsfelagið javnan fingið fyrispurningar frá stjórum, leiðarum og stovnsleiðslum um at leggja kanningina fram á teirra arbeiðsplássi. Eisini er Starvsfelagið í tøttum samskifti við avvarðandi sáttmálapartar.

– Fundirnir hava verið góðir, og eg fegnist um, at partarnir hava tikið væl ímóti framløguni og taka trupulleikan í álvara, sigur Súni Selfoss.

Hann sipar millum annað til útmeldingarnar hjá almennu og privatu arbeiðsgevarunum, ið siga seg vilja seta happing ovast á dagsskránna og orða ein greiðan starvsfólkapolitikk og leiðreglur um happing á arbeiðsplássinum.

Súni Selfoss fegnast um stigið, ið Starvsfelagið sum fyrsta fakfelagið á føroyska arbeiðsmarknaðinum hevur tikið til tess at basa happing. Men hann leggur aftrat, at felagið helmar ikki í. Nevndin í Starvsfelagnum hevur avrátt at fylgja gongdini neyvt næstu tíðina, og tí kann væntast, at ein nýggj og uppfylgjandi kanning verður sett í verk. Tað er vanligt aðrastaðni, at kanningar verða fylgdar upp, og vanliga ganga tvey ár millum kanningarnar, vísir Súni Selfoss á.

– Vónandi fara vit til ta tíð at síggja stórar batar í tølunum, leggur hann aftrat.

### Hartar eftirlitsmyndugleikan

Tað er Arbeiðs- og brunaeftirlitið, sum er eftirlitsmyndugleiki í Føroyum og varðar av trygd og trivnaði á arbeiðsplássum. Myndugleikin skal tryggja, at arbeiðsumhvørvið altíð er nøktandi, og at galdandi lógir og reglur á økinum verða fylgdar.

Á heimasíðuni hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum er rúgvismikið tilfar tøkt, hvussu til ber at basa happing á arbeiðsplássinum. Hetta fegnast Starvsfelagið um.

Kortini hartar formaðurin í Starvsfelagnum eftirlitsmyndugleikan og eftirlýsir, at Arbeiðs- og brunaeftirlitið sum stovnur er sjónligari og virknari og til at fáa fatur á.

– Vit hava í fleiri umførum, bæði fyri, undir og eftir kanningina, royndt at fingið fatur á Arbeiðs- og brunaeftirlitinum, men uttan úrslit. Tí mugu vit staðfesta, at eftirlitsmyndugleikin er ikki til staðar og púra fráverandi, og tað er als ikki í lagi, sigur Súni Selfoss.

Hann undrast stórliga, tí kanningin hjá Starvsfelagnum varskógvar, at ógvuliga nógvir limir í felagnum eru fyri happing á arbeiðsplássinum. Tí átti tað at verið eitt mál av stórum týdningi fyri Arbeiðs- og brunaeftirlitið, heldur hann.

Men enn hevur Arbeiðs- og brunaeftirlitið ikki latið við seg koma. Og tað undrar formannin í Starvsfelagnum.

– Eg kundi hugsað mær at vitað, hvat Arbeiðs- og brunaeftirlitið ætlar at gera við støðuna. Eg sakni, at myndugleikin stígur fram og setur út í kortið, tí eingin kann liva við støðuni, sum nú er. Myndugleikin má taka sær um reiggj, sigur Súni Selfoss.

Vit hava í fleiri umførum roynt at fingið eina viðmerking til hesa grein frá Leivi Persson, stjóra á Arbeiðs- og brunaeftirlitinum, men tað hevur ikki eydnast.

*Eftir samrøðuna við Súna Selfoss er samband fingist millum Starvsfelagið og stjóran á Arbeiðs- og brunaeftirlitinum, Leiv Persson, og fundur er avtalaður. Felagið vónar at fáa eitt munagott samstarv við stovnin framyvir.* ■

## ÁLITISFÓLKAVAL



**Annaðhvørt ár er nýval** av øllum álitisfólkum í okkara álitisfólkaskipan. Val av nýggjum álitisfólkum fór fram í oktober og november 2023.

Tað eru limir okkara á deildum/stovnum, ið hava rætt at velja og stilla upp til álitisfólkaval.

Í løtuni eru á leið 100 álitisfólk í okkara álitisfólkaskipan. Álitisfólkini hava til høvuðsuppgávu at tryggja, at sáttmálarnir verða hildnir á arbeiðsplássunum.

22 álitisfólk eru nývald. Tey nývaldu fara á grundskeið 1 í vár, og í heyst fara tey á grundskeið 2. Skeiðini plaga at vara tveir ella tríggjar dagar hvørja ferð.

Á skeiðunum fáa álitisfólkini grundleggjandi kunnleika um, hvat uppgávan hjá álitisfólkinum er, og hvat sáttmálin og viðkomandi arbeiðsmarknaðarlógir merkja. Eisini verða onnur spennandi evni, ið hava við tað sálarliga arbeiðsumhvørvið at gera.

Vit ynskja øllum teimum nývaldu til lukku við valinum og gleðast um, at tey hava tikið hesa týdningarmiklu uppgávuna á seg.



# Var offur fyri happing og segði upp

Tekstur: **Jákup Bogi Joensen** ///
Myndir: **Tilgjørd/Jens Kristian Vang**

**Happing er sálarliga niðurbrótandi og elvir til mistrivnað. Tað sigur starvsfólk, ið hevur upplivað happing á sínum fyrrverandi arbeiðsplássi og ógvisligu avleiðingarnar. Ráðini eru at siga frá og um neyðugt at siga upp, heldur starvsfólkið**

**LJÓTUR ATBURÐUR** og niðrandi viðmerkingar, grátandi starvsfólk og ein vánaligur arbeiðsmoralur, ið gjørdi umhvørvið púra ótolandi.

Soleiðis lýsir eitt starvsfólk, ið hevur upplivað happing og vil vera dulnevnt, gerandisdagin á einum fyrrverandi arbeiðsplássi.

### At enda fleyt yvir.

– Eg segði upp og fór í vissuni um, at tað var rætta avgerðin. Tað er ikki vert at verða verandi á einum arbeiðsplássi og bøta við sálarligu heilsuni.

Happing hevur fleiri andlit og kann daga undan í ymsum útgávum. Í hesi greinini sigur dulnevnda keldan frá sínum persónligu upplivingum.

– Eg var júst komin aftur úr farloyvi og varnaðist, at tað ruggaði ikki rætt á skrivstovuni. Annað fólk var komið í starv, og tónin var vorðin øðrvísi. Tosað varð ljótt, happandi og manninkandi, og ein av mínum starvsfeløgum hoknaði undir trýstinum og fór grátandi til hús um dagarnar. Eg gjørdi ovastu leiðsluna varuga við støðuna og helt, at viðferðin av starvsfelagnum var órein og óvirðilig. At enda segði starvsfelagin seg úr starvi, og eg gjørdist næsta ofrið fyri happingini. Eisini eg græt stundum í bilinum frá arbeiði. Men eg hugsaði ikki beinanvegin, at tað var happing. Tað var als ikki í mínum tonkum at kalla tað so. Tann tankin kom til mín seinni og so líðandi, tá ið onnur starvsfólk, sum eisini eru farin av arbeiðsplássinum, settu orð á neyvt somu upp-

framhald ///

> „Eg vendi mær til ovastu leiðsluna at siga frá óskilinum, men einki hjálpti."

livingar, sum eg havi havt. Tað var ikki fyrr enn tá, at klokkurnar fóru at ringja, og tað gekk upp fyri mær, hvørjum eg havi verið fyri á arbeiðsplássinum.

## Sjónligu tekinini

Tekinini høvdu annars ikki skortað. Starvsfólk vóru strongd og illa við og høvdu ilt við at hugsavna seg og siga frá, tí tey óttaðust avleiðingarnar.

– Eg tók mær løgi at flýggja, so eg ongantíð var í einrúmi við happaranum, og fann stundum upp á ymsar umberingar um ørindi aðrastaðni í húsinum. Seinni havi eg mangan hugsað, hví eg mundi gera tað. Helst er svarið, at tað hevur verið ein ótilvitaður tanki um at sleppa mær burtur úr ótolandi støðuni, sum eg var í.

Onnur tekin vóru eisini um eitt ógvuliga vánaligt arbeiðsumhvørvið og vaksandi mistrivnað millum starvsfólkini. Við jøvnum millumbilum vórðu fundir slitnir í ótíð uttan greiðar og ítøkiligar niðurstøður og uppgávur, sum onnur áttu at havt loyst, av órøttum álagdar starvsfólkum. Atgongd til tól og upplýsingar vórðu noktað, so starvsfólk ikki fingu gjørt sítt arbeiði til lítar. Mistrivnaðurin breiddi seg og fekk fastatøkur, og eitt skifti søgdu so nógv starvsfólk seg úr starvi, at bara eitt starvsfólk var eftir og mátti átaka sær uppgávur fyri fleiri. Ovasta leiðslan varð kunnað um óhaldbaru støðuna, men tað broytti einki.

## Sópa undir gólvteppið

At enda gjørdist støðan so vánalig, at eingin loysn og eingin vón tóktist at vera í eygsjón.

– Eg vendi mær til ovastu leiðsluna at siga frá óskilinum, men einki hjálpti. Eg veit ikki, um tað er satt, men eg sat eftir við teirri kensluni, at leiðslan helt tað vera knarr og tók ikki málið í fullum álvara.

Men á skrivstovuni gjørdist huglagið bara verri og versnaði. Happingin helt fram við sama lag, stundum við ógvisligum herðindum, og tað skelkaði fleiri av starvsfólkunum.

– Eg var ógvuliga illa við, og komið var at mørkum. Eg fór til hús og skrivaði uppsøgnina, sum eg sendi ovastu leiðsluni við telduposti sama kvøldið. Eg segði leiðsluni, hvat eg helt um støðuna, at eg ivaðist í handfaringini, og vísti á, at eg var fjórða starvsfólkið eftir stuttari tíð, sum segði seg úr starvi við happing og mistrivnaði sum grundgeving. Fleiri starvsfólk eru síðani farin sama veg. Eg haldi, at tað átti at fingið onkra klokku at ringja hjá leiðsluni.

Tað undrar fyrrverandi starvsfólkið stórliga, at leiðslan á stovninum hevur drálað og framvegis ikki tykist at hava gjørt stórvegis við málið, hóast rúm tíð er fráliðin, síðani starvsfólkið fór av stovninum.

Ráðini frá dulnevnda starvsfólkinum til stovnsleiðslur, bæði almennar og privatar, ið verða varskógvaðar um happing, eru tí púra greið: Tak málið upp og loys trupulleikan alt fyri eitt.

– Tað nyttar ikki at sópa trupulleikarnar undir gólvteppið, tí fyrr ella seinni er so nógv sópað, at til ber ikki at ganga eftir gólvinum, tí so nógvir skitnir sannleikar fjala seg undir teppinum.

Og, leggur starvsfólkið aftrat, er talan um eina sunna og góða og at sær komna leiðslu, verður hond tikin um fráboðanir um happing beinanvegin.

– Tað má vera uppgávan hjá leiðsluni at tryggja góðar karmar, so happing ikki fer fram á arbeiðsplássinum, og tosað verður virðiliga á stovninum. Bæði millum leiðslu og starvsfólk.

## Sig frá, sig upp og gevst

Dulnevnda starvsfólkið er í dag farið í annað starv. Men upplivingin á fyrrverandi arbeiðsplássinum hevur sett síni djúpu spor.

– Eg havi søkt onnur størv og eri biðin um at koma til samrøðu. Tað er gleðiligt, men tað hevur ikki verið uttan avbjóðingar, tí so djúpt stingur tað, ið eg áður havi upplivað. Helst stendst henda kenslan av ótta og ræðslu fyri at uppliva happing av nýggjum.

Spurningurin er so, hvørji ráðini eru til teirra, ið uppliva happing á arbeiðsplássinum. Dulnevnda starsvfólkið er ikki í iva. Tað ræður um at seta greið mørk.

– Sig frá, sig upp og gevst á arbeiðsplássinum. Finn nýggjar leiðir. Happing skeiklar sjálvsmyndina og fer ógvuliga illa við fólki. Tað er ikki vert at seta lív og heilsu í váða fyri arbeiðsplássið og lønina eina. Lívið er ov stutt til tess og alt ov dýrabart.

Tí er áheitanin frá dulnevnda starvsfólkinum púra greið, tá ið um happing og mistrivnað á arbeiðsplássinum ræður.

– Vit hava øll ábyrgd at siga frá og virka fyri betri og sunnari mentan á arbeiðsplássinum.

## Vilja basa happingini

Vit hava verið í sambandi við leiðsluna á fyrrverandi arbeiðsplássinum hjá dulnevndu kelduni.

Leiðslan á arbeiðsplássinum harmast almikið um, at starvsfólkið sigur seg hava verið fyri happing og hevur ta fatan, at einki varð gjørt við happingina frá leiðslunnar síðu.

Leiðslan vil ikki, at happing skal vera á arbeiðsplássinum og hevur orðað ein politikk fyri økið.

Leiðslan ætlar í næstum at seta uppaftur fleiri tiltøk í verk til tess at forða fyri og basa happing á arbeiðsplássinum.

*Starvsfelagið kennir samleikan og veit, hvør dulnevnda keldan í greinini er.* ■

> „Tað má vera uppgávan hjá leiðsluni at tryggja góðar karmar, so happing ikki fer fram á arbeiðsplássinum, og tosað verður virðiliga á stovninum.“








# Starvsfelagið veitti endurgjald fyri trekta løn

**Starvsfelagið veitir fult endurgjald fyri frádrigna løn undir samhugaverkfallinum.**

**BEINT EFTIR**, at samhugaverkfallið var avblást, fór arbeiðið í gongd við at finnað út av, hvussu tað, sum tikið var av lønini, skuldi endurgjaldast.

Flestu lønirnar á almenna arbeiðsmarknaðinum verða fluttar á konto frá Gjaldstovuni, og tí er tað eisini Gjaldstovan, sum trekkir tímarnir frá fyri verkfalsdagin.

Vit settu okkum tí í samband við Gjaldstovuna, har vit vildu fáa so nógvar upplýsingar sum møguligt um trektu lønina.

Fyri okkum hevði tað verið best og ruddiligast, um vit fingu upplýsingar um alt, men vegna persónsdátuverndarlógina ber tað ikki til.

Flytingin fyri frádrignu tímarnar kundi ikki gerast, fyrr enn Gjaldstovan hevði avgreitt sínar lønarflytingar, og tí tók tað eitt sindur longri tíð, áðrenn limir okkara fingu tað, tey áttu til góðar frá Starvsfelagnum.

So skjótt vit høvdu fingið neyðugu upplýsingarnar, varð farið undir at gera flytingarnar, men tað tók nakað av tíð at avgreiða allar flytingar, sum máttu gerast manuelt, samstundis sum manglandi upplýsingar frá hvørjum einstøkum skulu fáast til vega.

Flestu limirnir hava nú fingið endurrindað lønina, sum varð drigin frá vegna samhugaverkfalsdagin, men er onkur eftir enn, sum heldur seg hava rætt til at fáa endurrindað frádrigna løn, so mugu tit venda tykkum til skrivstovu felagsins, so vit kunnu fáa hetta í rættlag.

Fortreytin fyri, at felagið kann endurrinda lønina, er at neyðugu upplýsingar eru til taks.

So hvørt sum lønarflytingarnar eru gjørdar, verða allar persónsupplýsingarnar, felagið hevur fingið í hesum sambandi, strikaðar. ■



„Happing er eitrandi og oyðileggjandi fyri menniskju. Tí havi eg ógvuliga stóra virðing fyri, at Starvsfelagið tekur málið upp og hevur latið hesa kanningina gera.“

# HAPPING er eitrandi og skaðilig

Tekstur: **Jákup Bogi Joensen**
Myndir: **Jens Kristian Vang**

**Happing er herskin kostur og hevur skaðilig árin, ávarar námslektari í sernámsfrøði. Happing er sum oftast úrslit av teirri ráðandi mentanini í umhvørvinum, og tí hevur tað stóran týdning, at arbeiðspláss gera sær greitt, hvør mentan valdar á staðnum**

– **HAPPING ER SKAÐILIG** og ikki at spæla við. Happing kann hava álvarsligar avleiðingar og elva til likamligar, sálarligar og kensluligar løstir. Tí eigur happing á arbeiðsplássum at verða tikin í allarstørsta álvara.

Tað sigur Katrin av Kák, sum er útbúgvin cand.pæd.psyk. frá Danmarks Pædagogiske Universitet, DPU, og cand.mag. í fronskum við hjágrein í sálarfrøði frá lærda háskúlanum í Keypmannahavn.

Dagliga starvast hon sum námslektari í sernámsfrøði og undirvísari á Námsvísindadeildini á Fróðskaparsetri Føroya og hevur seinastu árini verið við til at gera fleiri kanningar um happing í fólkaskúlanum.

Saman við Gallup Føroyar hevur Katrin av Kák eisini staðið fyri nýggjastu kanningini hjá Starvsfelagnum um happing á føroyskum arbeiðsplássum.

Gransking hevur víst, at happing kann fara ógvuliga illa við fólki og vera orsøk til eitt nú strongd, trupulleikar við svøvni, hjarta- og æðrasjúkur, diabetes, blóðtøppar og heilabløðing. Happing kann eisini elva til sálarligar trupulleikar sum ótta, angist og tunglyndi og kann í ringasta føri elva til sjálvmorðstankar og sjálvmorð.

– Tað er herskin kostur, vit hava við at gera, sigur Katrin av Kák.

## Mentanin

Men hvat er happing?

Katrin av Kák vísir á, at granskarar eru ikki á einum máli um, hvussu happing neyvt skal skiljast og skilmarkast. Hinvegin eru granskarar samdir um, at happing sum hugtak eigur at verða hugsað av nýggjum, tí happing er ikki sum áður hildið einans eitt verandi millum happaran og tann, sum er fyri happingini, men ávirkast í nógv størri mun av ráki, sum stendst í bólkum – eitt nú á arbeiðsplássum, í sosialum relatiónum, í samskifti og í mentanini, sum valdar á staðnum.

Ríkissjúkrahúsið í Keypmannahavn hevur granskað nógv í happing. Granskingin vísir, at kjarnin í happing er útihýsing. Ein allýsing, sum tí ofta verður nýtt, er, at happing er, *„tá ið eitt ella fleiri starvsfólk uppliva seg at verða útihýst frá arbeiðsfelagsskapinum, sum tørvur er at vera partur av“.*

Happing og útihýsing er ein subjektiv kensla og uppliving. Ítøkilig dømi um útihýsing kunnu vera, at meiningar og sjónarmið ikki verða hoyrd. Tað kann eisini vera, at persónurin kennir seg eyðmýktan, niður- og tillátursgjørdan, ella at tosað verður ljótt og aftan fyri bakið.

Útihýsing kann eisini hava við týðandi viðurskifti á arbeiðsplássinum at gera. Til dømis at verða hildin uttan fyri fundir og sosial tiltøk, at kunning verður afturhildin og starvsfólkalig hjálp noktað.

Tað eru við øðrum orðum fleiri tekin, ið kunnu eyðmerkja happingina.

– Ein mentan stendst ikki av sær sjálvari. Mentan er eitt, ið vit menniskju skapa. Tí hevur tað týdning, at arbeiðspláss og starvsfólk í felag seta sær tann grundleggjandi spurningin, hvussu mentanin er á arbeiðsplássinum, og hvussu starvsfólkini trívast og eru saman um arbeiðslívið, sigur Katrin av Kák.

Hon vísir á, at øll menniskju hava grundleggjandi tørv á at hoyra til í felagsskapi, og tí er útihýsing og happing so skaðilig.

Men hvar gongur markið millum happing og tað at arga?

– At arga er at halda seg innan fyri mark. Arging er, tá ið báðir partar – tað er tann, ið argar, og tann, ið verður argaður – eru samdir um, at tað er stuttligt og einki ilt liggur aftanfyri. Men vandin er, at javnvágin koppar, og annar parturin ikki heldur tað vera stuttligt longur og sigur til. Tá er talan um happing, sum eigur at steðga beinanvegin, sigur Katrin av Kák.

Spurningurin er so, hvussu forðað kann verða fyri happing á arbeiðsplássum.

– Tað ber illa til at steðga happing frá einari løtu til aðra. Mentanin á einum arbeiðsplássi mennist ofta gjøgnum rúma tíð, og tí krevst eisini tíð til at venja arbeiðsplássið av aftur við ósunnu mentanina og skapa og menna nýggja og øðrvísi mentan, sigur Katrin av Kák.

Hon heldur, at tað er í arbeiðinum at orða nýggja mentan, at grundin til eitt gott og sunt arbeiðsumhvørvið, har happing ikki verður góðtikin, verður løgd. Men til tess krevst, at arbeiðsplássið og starvsfólkini í felag tora at hyggja inneftir og seta orð á viðurskifti, ið hava við mentanina á arbeiðsplássinum at gera.

– Vandin er, at ósemja kann taka seg upp. Kanska duga arbeiðs-

framhald ///

### SOLEIÐIS KANST TÚ FORÐA FYRI OG STEÐGA HAPPING Á ARBEIÐSPLÁSSINUM:

1. **Ogna tær vitan** um happing, og hví happing tekur seg upp.
2. **Steðga á** og kanna eftir, hvussu mentanin er á tínum arbeiðsplássi. Tosa við tínar starvsfelagar.
3. **Sig frá!** Boða altíð leiðsluni ella álitisfólki og/ella trygdarumboði frá, um tú upplivir happing ella veitst um onkran, sum er fyri happing á arbeiðsplássinum.

pláss ikki í nóg stóran mun at handfara og greiða ósemjur. Men tað hevur avgerandi týdning fyri eitt og hvørt arbeiðspláss at samskifta innanhýsis og tosa um avbjóðingarnar á staðnum. Hetta hevur týdning, tí happing er ein subjektiv kensla og uppliving og rúmar tí møguleikanum fyri ymsum fatanum av veruleikanum. Tí er neyðugt at samskifta til tess at beina burtur møguligar misskiljingar og ósemjur, sigur Katrin av Kák.

## Moralurin

Katrin av Kák vísir annars á eitt hugtak, ið kann hava týdning, skulu vit skilja, hvussu samansett happing er sum fyribrigdi. Tað er hugtakið um hin sokallaða parallellmoralin. Hugtakið er áhugavert og kann geva eina ábending um, hví tað kann vera so lætt at falla fyri freistingini og gera tað skeiva heldur enn tað rætta.

Í stuttum ber til at siga, at tey, ið fremja henda moral í verki, eru tilvitað um, at tey gera øðrum órætt, og høvdu undir vanligum umstøðum ikki framt slíkar gerningar. Men í eini kroystari støðu, ið kann stava frá mentanini á arbeiðsplássinum – soleiðis gera vit! – kann tað vera til fyrimunar fyri starvsfólkið í júst teirri løtuni at fremja gerningin í verki og varðveita plássið á innanhýsis valdsstiganum og vera inni í hitanum, har tað er stuttligt at vera. Parallellmoralurin ger seg við øðrum orðum sekan í, at happing sleppur at halda fram á arbeiðsplássinum. Fyri at verja avgerðina verður funnið upp á frágreiðingar, ið kunnu rættvísgera gerningin. Ikki tí at tann, ið fremur gerningin, neyðturviliga vil tað, men tí at hann ella hon er partur av teirri ráðandi mentanini á arbeiðsplássinum og ikki megnar at siga til og bróta mynstrið.

Annað hugtak, ið er áhugavert í hesum sambandi, er tað, ið kallast sálarligur tryggleiki. Sálarligur tryggleiki merkir, at starvsfólk ikki skulu óttast at gera mistøk og um neyðugt at biðja um umbering fyri mistakið. Slíkur hugburður er fremjandi og skapar tryggleika, ið kann styrkja um felagsskapin, arbeiðsmoralin og arbeiðsplássið, sigur Katrin av Kák.

## Ábyrgdin

Katrin av Kák leggur dent á, at øll eiga ábyrgd til tess at forða fyri og steðga happing á arbeiðsplássinum – leiðsla og starvsfólk í felag og sum einstaklingar.

– At skáka sær undan ábyrgd er at skilja happing sum tongda at persónligum viðurskiftum og eginleikum. Men í dag vita vit, at happing er nógv meira samansett og ofta úrslitið av ráðandi mentanini á arbeiðsplássinum, og mentanini eru bæði leiðsla og starvsfólk partur av og eiga tí felags ábyrgd, sigur Katrin av Kák.

Hon er tó greið yvir, at fyri einstaklingin – serliga tann, ið er offur fyri happingini – kann tað vera trupult og ein avbjóðing at siga frá, tí happing er tabu og ofta tongd at skomm og skuldarkenslum. Var tað ikki tað, hevði tað helst verið so líkatil at sagt frá og steðgað happingini, men tað er sjáldan so einfalt.

Katrin av Kák vónar, at kanningin, sum Starvsfelagið hevur gjørt, kann vera við til at menna tilvitskuna um happing á arbeiðsplássum og steðga teimum ógvisligu avleiðingum, ið happing kann hava við sær.

– Happing er eitrandi og oyðileggjandi fyri menniskju. Tí havi eg ógvuliga stóra virðing fyri, at Starvsfelagið tekur málið upp og hevur latið hesa kanningina gera. Vónandi kann tað birta upp undir, at arbeiðspláss um landið taka happing í allar størsta álvara, sigur Katrin av Kák. ■

> „Happing kann hava álvarsligar avleiðingar og elva til likamligar, sálarligar og kensluligar løstir.“



# Skalt tú í barsil?

## Minst til tryggingina!

**Tá ið foreldur fara í barnsburðarfarloyvi og fáa útgjald úr barsilsskipanini, steðgar limagjaldið til Starvsfelagið, sum vanliga verður drigið frá lønini sjálvvirkandi. Hetta kann hava við sær, at tey ikki eru fevnd av tryggingini, tá ið tey mest hava brúk fyri henni**

MINST TIL AT KANNA, um tíni viðurskifti viðvíkjandi limaskapi í Starvsfelagnum og samlagstrygging felagsins eru í lagi, tá ið tíni starvsviðurskifti broytast. Tað hendir tíverri viðhvørt, at viðurskiftini við fakfelagið og samlagstryggingina hjá felagnum fara av lagi, tá ið fólk fara í barnsburðarfarloyvi.

Hetta kann hava við sær, at tey missa rættin til samlagstryggingina – sum er navnið á sjúkra- og lívstryggingini, sum limir í Starvsfelagnum hava gjøgnum felagið – tí tað vísir seg, at tey ikki hava goldið til tryggingina, hóast tey í roynd og veru hava rætt bæði til limaskap í felagnum og til trygging.

Orsøkin er, at tað eru nøkur viðurskifti, sum starvsfólkið ikki hevur hugsað um ella fingið í rættlag, tá ið arbeiðsstøðan broyttist.

### Fáa áminning

Felagið upplivir tíverri viðhvørt, at starvsfólk søkja eftir útgjaldi frá tryggingini og síðan varnast, at teirra viðurskifti ikki eru lagi, og at tey tí ikki eru fevnd av tryggingini, tá ið tørvur er á tí.

Hetta er sera harmiligt, og vit royna altíð at gera okkara til at tryggja okkum, at limir okkara ikki enda í hesi støðuni. Starvsfelagið boðar altíð limum frá, um inngjaldið fyri limaskap steðgar í eitt tíðarskeið, og at limaskapurin er um at fara úr gildi. Tá er umráðandi, at tit skjótast gjørligt seta tykkum í samband við felagið.

Eisini hevur felagið heitt á Barsilsskipanina at kunna foreldur, sum fáa útgjald, um, at tey skulu seta seg í samband við fakfelagið fyri at tryggja sær, at viðurskiftini eru í lagi, meðan tey fáa barsilsgjaldið. Hetta er eftir, at tær 24 vikurnar við rætti til barsilsløn frá arbeiðsgevaranum eru farnar, og farið verður yvir til barsilsgjaldið.

Tá skalt tú tryggja tær, at limagjaldið til Starvsfelagið og fasta gjaldið til Samlagstryggingina eru í lagi. Tosa altíð við felagið, um tað eru broytingar í tínum setanarviðurskiftum.

### Tín ábyrgd

Limaskapur í Starvsfelagnum og inngjald í Samlagstryggingina eru fortreytin fyri útgjaldi úr Samlagstryggingini. Bæði hesi viðurskifti skulu vera í lagi.

Vanliga er hetta eingin trupulleiki, tí hjá teimum flestu verður gjaldið til fakfelagið og til Samlagstryggingina flutt fast í sambandi við mánaðarlønina.

Um limaskapurin fellur burtur vegna broytt viðurskifti, er tað aloftast, tí at foreldur eru farin í barnsburðarfarloyvi og hava ikki boðað felagnum frá. Men tað sama er galdandi, fert tú t.d. úr arbeiði, gerst arbeiðsleys/-ur ella verður langtíðarsjúk/-ur. Tá hevur tú framvegis rætt til limaskap, men tú mást sjálv/-ur minnast til at tryggja tær, at viðurskiftini við limaskapi og trygging eru í lagi. ■



Felagið upplivir javnan, at foreldur í barnsburðarfarloyvi ikki vita, at tey eru givin at rinda limagjald. Tí eru tey ikki longur fevnd av tryggingunum, sum fylgja við limaskapinum. Mynd: Jens Kristian Vang



Niels Winther, stjóri í Føroya Arbeiðsgevarafelag. Mynd: privat

# Eggja til null-hugsjón

**Fíggjarmálaráðið, Føroya Arbeiðsgevarafelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið eru samd um at seta átøk í verk til tess at basa happing á øllum almennum og privatum arbeiðsplássum. Millum átøkini er at dagføra almenna starvsfólkapolitikkin og eggjan til null-hugsjón**

Tekstur: **Jákup Bogi Joensen**
Myndir: **Jens Kristian Vang og privat**

**HAPPING KANN Á ONGAN** hátt góðtakast og eigur ikki at koma fyri á føroyskum arbeiðsplássum.

Tað eru umboð fyri Fíggjarmálaráðið, Føroya Arbeiðsgevarafelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið samd um.

Partarnir varða í hvør sínum lagi av sáttmálaøkjum, ið hava nógvir limir í Starvsfelagnum.

Sambært kanning, sum Starvsfelagið hevur latið gera um happing á arbeiðsplássum, stendur ringast til í almenna geiranum, serliga á sáttmálaøkjum undir Fíggjarmálaráðnum.

Jan Mortensen, stjóri á lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum, sum eisini hevur starvsfólkamál undir sær, harmast um vánaliga úrslitið í kanningini.

– Tølini eru als ikki nøktandi, tí happing eigur ikki at koma fyri yvirhøvur, sigur hann.

Heldur ikki umboðið fyri kommunala geiran, Anita Fuglø, leiðari í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum, heldur, at happing kann góðtakast.

– Vit eiga at seta øll segl til fyri at basa happing, sigur hon.

Øðrvísi sær út fyri privata geiran. Kanningin vísir, at happing er minni vanlig á sáttmálaøkjum hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag. Men tað frítekur ikki privata geiran fyri ábyrgd í royndini at forða fyri happing, heldur Niels Winther, stjóri í Føroya Arbeiðsgevarafelag.

– Tað er gott, at Starvsfelagið varpar ljós á happing, men eg eri bilsin, at talið av limum í felagnum, sum hava upplivað happing á arbeiðsplássinum, er so stórt. Vit eiga at hava eina null-hugsjón fyri happing á arbeiðsplássum og arbeiða fyri at nærkast tí, sigur hann.

## Dagføra almenna starvsfólkapolitikkin

Í almenna geiranum tykist semja vera um, at tiltøk eiga at verða sett í verk til tess at venda keðiligu gongdini.

Jan Mortensen í Fíggjarmálaráðnum heldur, at almenni starvsfólkapolitikkurin er ótíðarhóskandi og eigur at verða endurskoðaður og dagførdur og hartil skerpaður.



Anita Fuglø, leiðari í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum. Mynd: privat/Jens Kristian Vang

Hann vísir á, at eitt gott og trygt arbeiðsumhvørvi er týðandi partur av almenna starvsfólkapolitikkinum, men at verandi politikkur í størri mun tekur atlit til likamliga arbeiðsumhvørvið enn tað sálarliga.

– Fyrr varð størri dentur lagdur á at fyribyrgja skaðum, óhappum og vanlukkum á arbeiðsplássum og minni á trivnað og sálarligt arbeiðsumhvørvi. Men tann javnvágin er við tíðini broytt munandi, og tí eigur almenni starvsfólkapolitikkurin at verða dagførdur, sigur hann.

Eisini á kommunala økinum eru batar fyri neyðini, heldur Anita Fuglø, leiðari í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum.

Hon vísir tó á, at Kommunala Arbeiðsgevarafelagið er sáttmálapartur, ið fyrst og fremst stendur á odda fyri samráðingum um løn og sáttmálaviðurskifti hjá starvsfólkum, sum arbeiða hjá kommununum. Felagið hevur ikki heimild at áleggja kommununum reglur um happing, men felagið kann heita á kommunurnar um at taka málið upp til viðgerar. Og tað fer felagið ætlandi at gera, sigur hon.

– Vit kunnu orða og seta ein vegleiðandi politikk um happing út í kortið og heita á kommunurnar um at viðgera politikkin og taka reglurnar til sín, sigur Anita Fuglø.

Í Føroya Arbeiðsgevarafelag, sum í stóran mun umboðar privata geiran, hava tey longu sett ávís tiltøk í verk til tess at forða fyri happing á arbeiðsplássum.

Niels Winther vísir á, at ráðgevingin

til limafyritøkurnar er styrkt munandi, millum annað við tilfari á heimasíðuni, og meira verður gjørt í næstum, sigur hann.

– Vit fara í næstum at framleiða meiri og betri tilfar, og tað er ætlað sum ein hjálp til limirnar at fyribyrgja og handfara mál um happing, sigur hann.

### Átøk í umbúna

Partarnir vísa annars á, at fleiri átøk eru í umbúna, ið hava til endamáls at tálma og koma happing á arbeiðsplássum til lívs.

Jan Mortensen frá Fíggjarmálaráðnum heldur, at ein góð byrjan kundi verið at savna allar almennar stjórar og stovnsleiðarar til eitt tiltak saman við Starvsfelagnum at viðgera úrslitini í kanningini og happing í breiðastu merking.

Anita Fuglø frá Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum tekur undir við hesum hugskoti og heldur, at tað kundi verið ein gongd leið at farið. Felagið kundi eisini skipað fyri tema- og evnisdøgum um arbeiðsumhvørvi og sálarheilsu, heldur hon.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur longu verið í sambandi við Starvsfelagið, eftir at úrslitið av kanningini varð alment. Eitt tiltak hevur verið í Vinnuhúsinum, har umboð fyri Starvsfelagið legði kanningina fram fyri fyritøkur, sum eru fevndar av sáttmálanum millum Starvsfelagið og Føroya Arbeiðsgevarafelag og fyri starvsfólk í Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Tað eru tó ikki bara keðilig tíðindi at frætta í kanningini, halda sáttmálapartarnir. Fíggjarmálaráðið, Føroya Arbeiðsgevarafelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið fegnast um, at starvsfólk í bæði almenna og privata geiranum tykjast at vita, hvagar tey skulu venda sær, um so er, at tey ella onnur á arbeiðsplássinum eru fyri happing.

– Hetta er tekin um, at verandi fráboðanarskipanir sum heild virka væl, og starvsfólk vita, at tey altíð kunnu venda sær til leiðsluna á arbeiðsplássinum ella til álitisfólkið og/ella trygdarumboðið á staðnum. Og er leiðslan trupulleikin, kann boðast frá hjá álitisfólki og/ella trygdarumboði, ið síðani kann venda sær til avvarðandi fakfelag við málinum, siga tey. ■

„Fyrr varð størri dentur lagdur á at fyribyrgja skaðum, óhappum og vanlukkum á arbeiðsplássum og minni á trivnað og sálarligt arbeiðsumhvørvi. Men tann javnvágin er við tíðini broytt munandi“



Jan Mortensen, stjóri á lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum
Mynd: privat/Jens Kristian Vang

# ÁRSINS ÁLITISFÓLK 2024

## Hjálpið okkum at kjósa ársins álitisfólk

Arbeiðið sum álitisfólk hevur ómetaliga stóran týdning fyri felagið, limir og stovnsleiðslur. Góð álitisfólk hava um nakar uppiborið eitt herðaklapp!

Sendið tí felagnum uppskot um, hvør tit halda eigur at verða kosin ársins álitisfólk á aðalfundinum 9. mars.

**Í uppskotinum skal dentur leggjast á:**

- *Royndir sum álitisfólk*
- *Virkin í fakfelagshøpi*
- *Arbeiðið fyri at verja rættindi hjá limum*

**Sendið okkum ein teldupost á starvsfelag@starvsfelag.fo við tykkara uppskoti og grundgevingum í seinasta lagi 6. mars 2024.**

# AÐALFUNDUR

Ársaðalfundur Starvsfelagsins verður leygardagin 9. mars 2024 kl. 15.00 í Smæruni, J.H. Schrøtersgøta 7, Tórshavn.

**Skrá fyri aðalfundin:**

1 **Frásøgn formansins frá**
  **a) farna ári og**
  **b) virki felagsins frameftir**
2 **Gestarøðarar:**
  **Rita C. Bundgaard, forkvinna í HK Stat og samráðingarleiðari: Soleiðis skipa tey felags samráðingar**
  **Uni Holm Johannesen, stjórnmálafrøðingur og løgtingsmaður: Sleppið stívrendu samráðingunum**
3 **Framløga av grannskoðaðum roknskapum til góðkenningar**
4 **Møguligar lógarbroytingar**
5 **Møgulig uppskot frá limum og nevnd**
6 **Ásetan av limagjøldum**
7 **Val av forfólki**
8 **Val av grannskoðara og tiltakslimi**
9 **Ymiskt**

Limir, sum vilja hava uppskot til umrøðu á aðalfundinum og møgulig lógaruppskot, mugu senda nevndini tey í seinasta lagi **leygardagin 2. mars 2024.**

starvsfelagið

## AÐALFUNDUR

Ársaðalfundur í Samlagstryggingargrunni Starvsfelagsins verður hósdagin 29. februar 2024, kl. 19.00 í hølum Starvsfelagsins. J.H. Schrøtersgøta 9, Tórshavn.

**Skrá:**

1 Frásøgn um virki grunsins í farna roknskaparári.
2 Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar.
3 Viðtøkubroytingar.
4 Val av nevndarlimum.
5 Ymiskt.

Limir sum vilja hava uppskot til umrøðu á aðalfundinum og møgulig lógaruppskot, mugu senda nevndini hesi í seinasta lagi **hósdagin 22. februar 2024.**

**NEVNDIN**

# Uppskot til aðalfundin

**ÁMINNING:** Uppskot frá limunum í Starvsfelagnum til ársaðalfundin skulu vera skrivstovu felagsins í hendi í seinasta lagi 7 dagar undan aðalfundinum.

Hetta merkir, at hevur tú eitt uppskot til broytingar í viðtøkum felagsins ella annað uppskot til aðalfundin, skal uppskotið vera skrivstovuni í hendi **í seinasta lagi leygardagin 2. mars 2024.**

# Soleiðis basa tey HAPPINGINI

**Vit hava spurt trý miðalstór og stór arbeiðspláss, hvussu tey handfara happing.**




Tekstur: **Jákup Bogi Joensen**

## 1 SELMA HERUP, starvsfólkaleiðari á Landssjúkrahúsinum:


Selma Herup.
Mynd: privat

**Hava tit upplivað happing á tykkara arbeiðsplássi?**
Vit eru greið yvir, at happing kann taka seg upp, og okkurt mál hevur verið hjá okkum, sum vit hava tikið hond um og loyst.

**Hvussu tilvitað eru tit um vandan fyri happing?**
Vit eru ógvuliga tilvitað um happing og trivnað sum heild. Landssjúkrahúsið hevur ein greitt orðaðan felags politikk um trivnað, ið eisini umfatar happing.

**Hvat gera tit til tess at forða fyri happing á tykkara arbeiðsplássi?**
Landssjúkrahúsið er eitt av landsins størstu arbeiðsplássum við okkurt um 1.000 starvsfólkum. Tí er tað ein stór og møtimikil uppgáva at røkka út á allar deildir. Men vit gera javnan trivnaðarkanningar og samskifta beinleiðis við leiðararnar á ymsu deildunum. Á tann hátt hava vit fingurin á pulsinum og vita, hvat rørist millum starvsfólkini. Eisini heita vit á okkara starvsfólk um at boða frá, eru tey ella onnur á Landssjúkrahúsinum fyri happing.

## 2 DIANA GILSTÓN, HR-leiðari á TAKS:


Diana Gilstón.
Mynd: Jens Kristian Vang

**Hava tit upplivað happing á tykkara arbeiðsplássi?**
Happing er ikki nakað, sum vit hava borið eyga við ella merkt nógv til á stovninum. Vit hava fyri stuttum gjørt eina innanhýsis kanning, og hon vísir góð úrslit. Vit halda, at vit hava eitt gott arbeiðspláss, og vilja gera alt fyri at tryggja góðan trivnað og halda happingini burtur.

**Hvussu tilvitað eru tit um vandan fyri happing?**
Vit eru sera tilvitað um vandan fyri happing, um týdningin av góðum trivnaði millum starvsfólkini og keðiligu avleiðingarnar av mistrivnaði. Tí eru vit eisini opin fyri teirri nýggju vitanini, sum nú er komin undan kavi, og vit taka vitanina í størsta álvara.

**Hvat gera tit til tess at forða fyri happing á tykkara arbeiðsplássi?**
Leiðslan á stovninum hevur sæð kanningina hjá Starvsfelagnum, og vit halda, at tað er eitt gott hugskot, at starvfólkini eisini fáa høvi at síggja kanningina og gera sær sínar egnu tankar um happing, og um tað er nakað, sum fyllir á okkara arbeiðspláss. Tí hava vit heitt á Starvsfelagið um at leggja kanningina fram fyri okkara starvsfólk. Eisini heita vit á starvsfólk um at siga frá, eru tey ella onnur á stovninum happað.

115 fólk starvast hjá TAKS.

## 3 BÁRA M. GÁSADAL, starvsfólkastjóri á Føroya Tele:


Bára M. Gásadal.
Mynd: privat

**Hava tit upplivað happing á tykkara arbeiðsplássi?**
Vit hava onga fráboðan fingið um happing ella havt illgruna um happing á okkara arbeiðsplássi. Úrslitið í kanningini hjá Starvsfelagnum er tí komið óvart á okkum.

**Hvussu tilvitað eru tit um vandan fyri happing?**
Vit eru tilvitað um, at happing kann standast á einum og hvørjum arbeiðsplássi og tí eisini á okkara arbeiðsplássi. Í starvsfólkahandbókini, sum Føroya Tele hevur orðað fyri fleiri árum síðani, er trivnaður raðfestur, og greiðar mannagongdir eru fyri, hvussu farast skal fram, um happing verður staðfest í samtakinum. Somuleiðis eru greiðar mannagongdir fyri, hvussu vit basa happing, og hvagar starvsfólk kunnu venda sær.

**Hvat gera tit til tess at forða fyri happing á tykkara arbeiðsplássi?**
Føroya Tele góðtekur ikki happing og hevur sum mál at arbeiða miðvíst fyri null-hugsjón á økinum. Tí eggja vit okkara starvsfólkum at siga frá, um tey ella onnur í samtakinum eru fyri happing, og minna annars á reglurnar í starvsfólkahandbókini.

Á Føroya Tele eru 180 ársverk.



# Ein vegur til tryggari starv og hægri løn

Tekstur: **Dánjal Højgaard**
Myndir: **Jens Kristian Vang**

**FØRLEIKAMENNING: Eins og onnur fakfeløg hevur Starvsfelagið bindandi avtalur í sínum sáttmálum við tað almenna um, at starvsfólk hava rætt til fakliga førleikamenning ella eftirútbúgving. Hesa avtalur hava ovurstóran týdning í eini talgildari rembingartíð, fyri kappingarførleikan um tey góðu størvini og møguleikarnar fyri at fáa hægri løn.**

**FØRLEIKAMENNING** av starvsfólki hevur onkuntíð verið sammett við viðlíkahaldið av einum bili. Verður bilurin sýndur regluliga, viðlíkahildin og umvældur, fær hann longri livialdur og meira varandi virði.

Á líknandi hátt er tað við okkara fakligu førleikum sum starvsfólk. Verða teir ikki røktir og mentir, verða vit minni eftirspurd sum arbeiðsmegi. Vit kunnu gerast taparar í kappingin um tey góðu og betur løntu størvini; kunnu í ringasta føri fáa trupulleikar við at varðveita verandi starv.

Arbeiðsmarknaðurin er í eini tøkniligari rembingartíð, har nógv av størvunum, vit kenna í dag, fara at hvørva. Granskingin vísir, at tey, sum duga best at umstilla og førleikamenna seg, verða eisini tey, sum fara at standa seg best, tá ið størv hvørva við automatiseringini, og nýggj koma í teirra stað.

Førleikamenning og eftirútbúgving eru eisini vegurin til hægri løn. Lønarskipanin hjá Starvfelagnum er ein dynamisk skipan, har til ber at flyta seg upp í hægri lønarflokk ella at fáa serliga lønarviðbót, tá ið tú fært betri fakligar førleikar og størri ábyrgd.

## Avtalur um førleikamenning

Starvsfelagið hevur í fleiri ár havt avtalur við almennu arbeiðsgevararnar, sum skulu tryggja, at starvsfólkini undir okkara sáttmálum áhaldandi verða førleikament og til reiðar at taka við nýggjum fakligum avbjóðingum. Hetta eru avtalurnar um strategiska og skipaða førleikamenning í sáttmálunum við Fíggjarmálaráðið (FMR) og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið (KAF).

Talan er um rammuavtalur, sum áseta, hvat leiðslur og starvsfólk á teimum einstøku almennu arbeiðsplássunum skulu gera viðvíkjandi førleikanningini. Yvirskipað siga hesar avtalurnar m.a., at

- hvørt einstakt arbeiðspláss skal gera strategiskt mál fyri menning av øllum starvsfólkum
- fyri hvørt einstakt starvsfólk skal verða gjørd ein skipað førleikamenningarætlan
- leiðsla og starvsfólk skulu hava sum mál at stovna eitt felags læruumhvørvi
- samrøður skulu á hvørjum ári vera millum leiðslu og starvsfólk, har menningarmálini fyri einstaka starvsfólkið verða ásett og fylgd upp.

framhald ///

### Árliga samrøðan

Árliga starvsfólkasamrøðan er ein hornasteinur í avtaluni um strategiska og skipaða førleikamenning. Hvussu samrøðan kann verða skipað, fáa vit eina ábending um í starvsfólkapolitikki landsins, sum er galdandi fyri arbeiðspláss undir landinum.

Eisini hevur starvsfólkapolitikkurin eina vegleiðing um, hvussu starvsfólkasamrøðurnar verða hildar, so at tær eru miðvísar og væl skipaðar. Eitt hent amboð hjá teimum, sum vilja hava avtalurnar um førleikamenning útintar á arbeiðsplássinum.

Samrøðan er millum starvsfólkið og nærmasta leiðaran, og endamálið við samrøðuni er at „tryggja, at einstaka starvsfólkið mennist, og at øll arbeiðsmegin á staðnum verður styrkt." Í samrøðuni skal møguleiki vera at skifta orð um eitt nú:

- verandi arbeiðsuppgávur, viðurskifti og úrslit
- broytingar í arbeiðsuppgávum
- fyritreytir at loysa komandi uppgávur
- skeiðsluttøka, persónlig menning, eftirútbúgving
- samstarv

> „Granskingin vísir, at tey, sum duga best at umstilla og førleikamenna seg, verða eisini tey, sum fara at standa seg best, tá ið størv hvørva við automatiseringini, og nýggj koma í teirra stað."

Í starvsfólkapolitikki landsins er eisini ein útbúgvingarpolitikkur, sum umrøður útbúgvingarmøguleikar og skeið. Og sum ásetur, hvussu miðvísar útbúgvingarætlanir verða lagdar til rættis fyri starvsfólkini.

### Leiðsla og starvsfólk hava ein leiklut

Sambært avtalunum við FMR og KAF skal útbúgving og annað menningarvirksemi fara fram í arbeiðstíðini, og tað er arbeiðsgevarin, ið rindar útreiðslur av útbúgving.

Starvsfelagið hevur í fleiri ár fingið ábendingar frá limunum um, at avtalurnar ikki virka eftir sínum endamáli, og nýggjasta kanningin millum álitisfólkini stuðlar eisini undir henda illgruna (les í aðrari grein.)

Hetta er eitt mál, felagið hevur tikið í stórum álvara og áhaldandi hevur varpað ljós á og reistfyri sáttmálapørtunum. Bæði í sáttmálasamráðingum og seinast á álitisfólkafundinum hjá felagnum í heyst.

Sum tann, ið hevur rætt at leiða og skipa arbeiði, meta vit tað verða rættiliga natúrligt, at arbeiðsgevarin er høvuðsstigtakari til førleikamenningina.

Sambært avtalunum við KAF og FMR hava starvsfólk og álitisfólk hinvegin týðandi leiklut í tiltøkunum.

Avtalurnar siga m.a., at „Leiðsla og starvsfólk hava felags ábyrgd av, at menningarmálini verða rokkin. Leiðslan skal tryggja karmar og treytir fyri førleikamenning, og starvsfólkið arbeiðir fram ímóti avtalaðu menningarmálunum."

Somuleiðis staðfesta avtalurnar, at leiðsla og starvsfólk í felag skulu áseta grundreglur og leiðreglur fyri førleikamenningartiltøkum og leiðreglurnar fyri starvsfólkasamrøður. Og í hesum sambandi hava samstarvsnevndirnar – har álitisfólkini eru umboð – avgerandi leiklut.

Gjøgnum samstarvsnevndirnar ella á annan hátt kunnu álitisfólkini tískil virka fyri, at grundreglur og leiðreglur verða gjørdar fyri mál og samrøður, og at tær árligu starvsfólkasamrøðurnar verða hildnar.



### Lesið meira

Á heimasíðuni hjá Starvsfelagnum www.starvsfelag.fo kanst tú lesa um:

- Avtalurnar um skipaða og strategiska førleikamenning aftast í sáttmálunum við Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, hygg undir Sáttmálar
- Útbúgvingarpolitikkur og Starvsfólkasamrøður + skjøl undir Starvsfólkapolitikkur Landsins ■





# Førleikamenning í hálvum gekki

Tekstur: **Dánjal Højgaard**

**LIMAKANNING: Nógv kenna ikki avtalurnar, hava ongari førleikamenning verið í og heldur onga persónliga starvfólkasamrøðu um menningarmál verið til. Limakanning hjá Starvsfelagnum bendir á, at avtalan um skipaða og strategiska førleikamenning verður ikki útint í verki**

**STARVSFELAGIÐ** hevur avtalur um skipaða og strategiska førleikamenning fyri starvsfólk, sum arbeiða hjá landi og kommunum og kommunalum stovnum. Avtalurnar eru partur av sáttmálunum við ávikavist Fíggjarmálaráðið (FMR) og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið (KAF).

Ein limakanning, sum varð gjørd í november í fjør, vísir tó, at tað eftir øllum at døma er langt millum orð og praksis.

### 538 svaraðu

1420 limir hjá Starvsfelagnum í sáttmálaøkjunum hjá KAF og FMR fingu 12 spurningar um førleikamenning á arbeiðsplássinum. Tilsamans 538 limir svaraðu spurningunum.

Spurningarnir snúðu seg í høvuðsheitum um, hvørt limirnir halda, at ítøkiligar ásetingarnar í avtalunum um strategiska og skipaða førleikamenning verða fylgdar. Harafturat vórðu teir spurdir um sína útbúgvingarstøðu, hvør tey halda skal rinda fyri førleikamenningina, og nær á degnum tey halda, at førleikamenningin liggur best.

### Úrslit

Kanningin vísur m.a., at

- bróðurparturin av teimum spurdu, uml. 70%, vita ikki, at felagið hevur nakra avtalur um strategiska og skipaða førleikamenning á almennu arbeiðsplássunum.
- tey flestu, 78% (KAF) og 81% (FMR), høvdu havt áhuga at tikið av tilboði um førleikamenning
- meiri enn annarhvør sigur, at teirra arbeiðspláss hevur onga skipaða førleikamenning av starvsfólkunum, soleiðis sum sáttmálin ásetur, 51% hjá FMR og 57% hjá KAF.
- ein stórur partur, 44% av teimum spurdu í FMR-økinum og 42% hjá KAF, siga, at tey hava ongantíð verið til nakra individuella starvssamrøðu við leiðsluna. Ávikavist 46 og 44% siga seg hava verið til starvsfólkasamrøður, men bert ein minni partur, 12%, sigur, at samrøðurnar hava verið á hvørjum ári, soleiðis sum sáttmálin ásetur.

Til ber at lesa alla kanningina á heimasíðuni hjá Starvsfelagnum. ■

## ARBEIÐSDAGAR Á VIÐAREIÐI

**Sum fastur táttur er, setur nevnd og umsiting í Starvsfelagnum tríggjar dagar av árliga fyri at leggja strategi fyri arbeiðið í felagnum fram til komandi aðalfund.**

Vit hildu arbeiðsdagarnar á Hotel Norð á Viðareiði 28.-30. mars 2023.

Har varð gjørdur ein arbeiðssetningur, ið vit so arbeiða út frá.

Endamálið við døgunum er eisini at eftirmeta virksemið í felagnum og at seta nýggj mál út í kortið.

Á skránni hesa ferð var m.a.:

- Nevndararbeiði og væntanir
- Bólkaarbeiði um heimsmálini
- Bólkaarbeiði um rekruttering, samskiftisstrategi v.m.
- Lønarlagið á almenna økinum
- Strategisk førleikamenning og strongd
- Vitjanir á arbeiðsplássum
- Starvsfelagið og umhvørvið
- Bólkaarbeiði um stuðulspolitikk
- Bólkaarbeiði um lønarskipan
- Eftirmeting av aðalfundardegnum
- Limatilboð
- Happing á arbeiðsplássum
- Summarhús
- Ársrhjól 2023/2024 varð gjørt fyri aktivitetirnar í felagnum

Vit fingu nóg frá hondini og hava roynt eftir førimuni at fáa avgreitt uppgávurnar, ið vit settu okkum fyri á arbeiðsdøgunum.



„Endamálið við lønarskipanini er at tryggja rættvísa løn fyri øll størv, sum sáttmálin fatar um.“



# UMFLOKKINGAR

## – mannagongd og starvsmetingarnevndin

Starvsmetingarnevndin er mannað av tveimum umboðum fyri Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og tveimum umboðum fyri Starvsfelagið. Frá vinstru: Una Djurhuus Christiansen, fulltrúi á lønardeildini, Jan Mortensen, stjóri á lønardeildini, Súni Selfoss, formaður í Starvsfelagnum, og Anna Johannesen, felagsskrivari í Starvsfelagnum. Mynd: Jens Kristian Vang

**Í SÁTTMÁLUNUM** við Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið er áseting um eina „Starvsmetingarnevnd“.

Hon kom í sáttmálarnar í 2001, tá ið vit fingu lønarskipanina, sum vit enn í dag hava. Henda lønarskipan er bygd upp í lønarflokkar, sum eru defineraðir eftir starvsinnihaldi og útbúgvingum.

Í starvsmetingarnevndini sita tvey umboð fyri Starvsfelagið og tvey umboð fyri ávikavist Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Endamálið við lønarskipanini er at tryggja rættvísa løn fyri øll størv, sum sáttmálin fatar um. Lønarskipanin skal tryggja, at javnstøða er millum kynini, tá ið lønin verður ásett. Tá ið størv verða flokkað, verður dentur lagdur á, at greitt samband er millum løn og starvsinnihald, ábyrgd, og hvar tey eru í bygnaðinum. Eisini skal verða tryggjað, at líknandi størv verða flokkað á sama hátt, óansæð á hvørjum stovni tey eru.

Øll størv skulu flokkast, áðrenn tey verða lýst leys.

Einki stendur í stað, tað ger arbeiðsmarknaðurin heldur ikki. Størvini broytast í takt við ta menning og økt krøv, sum verða sett til ein nýtímans arbeiðsmarknað. Tí er sera umráðandi, at starvslýsingin javnan

framhald ///

„Tá ið størv verða flokkað, verður dentur lagdur á, at greitt samband er millum løn og starvsinnihald, ábyrgd, og hvar tey eru í bygnaðinum.“



Una Djurhuus Christiansen, fulltrúi á lønardeildini



Starvsmetingarnevndin hittist javnan til fund um flokkingar av størvum. Mynd: Jens Kristian Vang

verður eftirhugd, so hon kann dagførast eftir teimum broytingum, sum eru gjørdar í starvsinnihaldinum.

Tá ið broytingar henda í starvsinnihaldinum og lønarásetingin skal ásetast, tá er tað, at starvsmetingarnevndin kemur inn í myndina.

Hvussu verður eitt mál so fyrireikað til starvsmetingarnevndina at taka støðu til? Tað, sum er sera umráðandi, er at ein starvslýsing er til taks, sum lýsir allar uppgávurnar í starvinum, stórar sum smáar. Harumframt hvørjar ábyrgir og heimildir liggja í starvinum, t.v.s hvørjum hevur tú ábyrgd av og hvat kanst tú taka avgerð um.

Aloftast er tað leiðslan, sum biður um umflokkingina, og hevur út frá starvslýsingini gjørt meting av, hvønn lønarflokk starvið skal umflokkast í.

Er talan um almennan stovn, sendir leiðslan umbønina um umflokking til sítt aðalráð, sum síðani sendir tað víðari til Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum. Er talan um ein kommunalan stovn, verður umsóknin send til Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Nú er málið komið til Starvsmetingarnevndina, og skjølini í málinum verða send til Starvsfelagið við áseting um ein fundardag, har vit møtast at viðgera umflokkingina.

Á fundinum í Starvsmetingarnevndini hava partarnir sett seg væl inn í málið og gjørt sær eina meting um, hvørt lønarflokkurin, sum biðið verður um, er rættur. Oftast eru vit samd um flokkingina, men tað hendir eisini, at vit eru ósamd og ikki vinna undirtøku fyri okkara meting.

Til ber eisini hjá Starvsfelagnum at biðja um at fáa eitt mál um umflokking í Starvsmetingarnevndina vegna ein lim. Málsgongdin er tann sama, men eitt sindur longur, tí tá verður málið sent til stovnin, sum limurin arbeiðir á, til viðmerkingar, og síðani aftur til sáttmálapartin, sum starvið hoyrir undir.

Lønardeildin hevur á síni heimasíðu eina vegleiðing um flokkingar og umflokkingar.



Una Djurhuus Christiansen og Jan Mortensen umboða Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag í starvsmetingarnevndini.





# Færri tryggingarveitingar í 2023

Jákup Danielsen, formaður í Samlagstryggingargrunni Starvsfelagsins

**Samlagstryggingin, sum limir Starvsfelagsins eru fevndir av, hevur í farna ári havt færri útgjaldingar til veitingar við deyða og hættisligar sjúkur.**

SAMLAGSTRYGGINGARGRUNNUR STARVSFELAGSINS hevur sum endamál at keypa tryggingar, ið geva veitingar við deyða ella við hættisligar sjúkur v.m. Samhaldsfasta hjálpin, sum tryggingarnar hjá grunninum veita, kemur væl við hjá teimum, sum verða rakt av hættisligari sjúku, og hjá teimum eftirsitandi, tá ið deyðin rakar. Tað er ein sannroynd, at tá ið sjúka ella deyði rakar, er tað kærkomið at vita sær, at tryggingarnar kunnu hjálpa fíggjarliga.




## Útgoldnar veitingar

At tað er stórur tørvur á grunninum sæst aftur í teimum útgoldnu veitingunum seinastu 26 árini. Gjaldið til grunnin, sum limirnir rinda, skal fíggja útgjaldingarnar, og hóast vaksandi útgjaldingarnar seinastu árini hevur grunnurin klárað at forsvara útgjøldini við inngjaldinum, sum limirnir rinda inn í grunnin.

Alt bendir á, at 2023 er eitt av frægaru skaðaárunum, og tískil verður mett, at útgjøldini vera nakað minni enn í 2022.

Seks útgjaldingar hava verið í sambandi við deyða, harav fýra útgjaldingar eru við deyða hjá hjúnafelaga. Tryggingarveitingar í sambandi við hættisliga sjúku eru 15 í tali; fimm lægri enn í 2022. Eitt útgjald var til hættisliga sjúku hjá barni.

Í tryggingaravtaluni ber til at fáa gjaldsundantøku í sambandi við óarbeiðsføri, og hava 10 limir fingið játtaða gjaldsundantøku.



Jákup Danielsen. Mynd: Privat

Tryggingin, ið veitir útgjald við viknandi hoyrn, tá ið hoyritól verða keypt, virkar væl, og talið á teimum limum, sum fáa hendan stuðul, øktist. Í 2023 fingu 25 limir útgjald til keyp av hoyritólum.

Tað kemur fyri, at samlagstryggingin ikki nøktar allan tørvin, tí tað eru sjúkur, sum ikki eru fevndar av tryggingini.

## Lokaupphæddin

Lokaupphæddin, ið hevur verið partur av skipanini, síðani samlagstryggingin var sett á stovn, hvørvur í 2027. Sostatt eru, sambært avgerð í 2018, bert trý ár eftir, har niðursett lokaupphædd verður útgoldin.

Rættiliga stórar upphæddir hava verið útgoldnar umvegis skipanina í grunninum. Í 2023 vórðu goldnar góðar 2, 1 mió. kr. til 53 limir. Mett verður, at tryggingarnar og lokaupphæddin kosta grunninum 6, 5 mió. kr. í 2023.



# Arbeiðsskaðar og endurgjøld

Tekstur: **Sigmund Poulsen, advokatur** Myndir: **Jens Kristian Vang**

**Starvsfólk, sum fáa skaða í arbeiðnum, mugu minnast til at seta í gongd arbeiðsskaðamál – bæði fyri at rætta møgulig ónøktandi arbeiðsviðurskifti og ikki minst fyri at fáa møguligt endurgjald**

**LØGTINGSLÓG** um arbeiðsumhvørvi er um, hvussu viðurskiftini skulu vera á arbeiðsplássinum, so arbeiðsskaðar ikki skulu henda.

Løgtingslóg um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða er um, hvørji rættindi arbeiðsfólk hava, tá ið arbeiðsskaði er hendur.

Tá ið skaði hendir, skal arbeiðsgevarin innan fyri átta dagar geva fráboðan eftir báðum teimum nevndu lógunum:

- Hann skal boða Arbeiðs- og Brunaeftirlitinum frá (Arbeiðs- og Brunaeftirlitið kannar viðurskiftini á staðnum, og hví skaðin hendi – eftir arbeiðsumhvørvislógini)
- Hann skal boða Føroya Vanlukkutryggingarráð frá (Arbeiðs- og Brunaeftirlitið fyrireikar málið til Vanlukkutryggingarráðið, sum viðger endurgjaldsspurningar vegna skaðan – eftir lógini um arbeiðsskaðar)

Oyðubløð eru at fáa hjá Arbeiðs- og Brunaeftirlitinum ella hjá tryggingunum.

Tann, sum hevur verið fyri arbeiðsskaða, kann hava rætt til tríggjar ymiskar endurgjaldsupphæddir:

1. Endurgjald fyri fíggjarligt tap í sambandi við skaðahendingina (til dømis lønarmissur, oyðiløgd klæðir, tort fyri sjúkradagar)
2. Endurgjald fyri varandi mein (hetta kann til dømis vera varandi lyfti- ella fallskaðar í ryggi, beinum, ørmum)
3. Endurgjald fyri mist vinnuføri. Hetta er fyri at viga upp ímóti, at tann skaddi vegna arbeiðsskaðan ikki longur kann vinna fulla inntøku. (Er vinnuførið skert við t.d. 45%-50%, kann talan typiskt vera uml. 1, 5 mió. fyri ein varandi arbeiðsskerjandi skaða sum nevnt undir 2. Er talan um meira enn 50% skerjing av vinnuføri, verður endurgjaldið ein mánaðarlig upphædd)

Tað er sera týdningarmikið, at Vanlukkutryggarráðið fær fráboðan um skaðan, tí annars hendir einki. Tað er arbeiðsgevarin, sum hevur lógarásetta fráboðanarskyldu, og tað ger hann við at boða sínum tryggingarfelag frá.

Sendir arbeiðsgevarin av onkrari grund ikki fráboðan inn, skal starvsfólkið gera tað sjálvt, tí so setir tryggingin ella Arbeiðs- og Brunaeftirlitið/Vanlukkutryggingarráðið seg í samband við arbeiðsgevaran um skaðan, og málið er í gongd.

Arbeiðs- og Brunaeftirlitið fyrireikar málið til Vanlukkutryggingarráðið, fær neyðugar upplýsingar til vega og biður typiskt um lækaváttanir frá lækna og sjúkrahúsjournalir. Tann skaddi fær upplýsingar, so hvørt sum Arbeiðs- og Brunaeftirlitið/Vanlukkutryggingarráðið innheintar frá fakpersónum og stovnum.

## Tryggingarskyldan

Allir arbeiðsgevarar og sjálvstøðug vinnurekandi hava lógarskyldu at tryggja síni starvsfólk og seg sjálv. Skuldi tað hent, at okkurt starvsfólk ikki er tryggjað, fær tað kortini rættindi eftir lógini. Tað er so ein løgfrøðiligur spurningur millum tryggingina og arbeiðsgevaran, um hann skal endurgjalda tryggingini heilt ella partvíst fyri tað, sum tryggingin hevur lagt út til tann skadda.

## Arbeiðsskaðar á almennum arbeiðsplássum

Tað almenna er undantikið tryggingarskylduni og kann velja at vera „sjálvtryggjandi". Tað merkir so, at tað er viðkomandi almenna arbeiðspláss, sum sjálvt skal gjalda endurgjøldini.

Arbeiðsskaðum á almennum arbeiðsplássum skal tað almenna arbeiðsplássið sjálvt boða frá beinleiðis til Arbeiðs- og Brunaeftirlitið.

## Arbeiðsskaðar og vinnusjúkur

Ein arbeiðsskaði er ein persónsskaði, sum er elvdur av einum tilburði ella eini ávirkan, sum hendir brádliga ella innan fyri fimm dagar.

Ein vinnusjúka er ein sjúka, sum starvsfólk fær, og sum eftir læknafrøðiligum og tøkniligum royndum er elvd av serligum árinum av arbeiðnum ella viðurskiftunum, sum arbeitt verður undir. Harumframt sjúkur, sum livandi fødd børn hava fingið í móðurlívi orsakað av arbeiði, móðirin hevði, meðan hon var við barn.

Fráboðan um vinnusjúku skal viðkomandi lækni lata Arbeiðs- og brunaeftirlitinum beinleiðis.

Fyri vinnusjúkur verður átta daga fráboðanarfreistin roknað frá tí degi, tann fráboðanarskyldugi gjørdist varugur við, at sjúkan kann vera komin av arbeiðnum.

## Málsgongdin

Arbeiðs- og Brunaeftirlitið fyrireikar mál at leggja fyri Vanlukkutryggingarráðið. Tá ið støða er tikin til, um talan er um arbeiðsskaða ella vinnusjúku, fær Arbeiðs- og Brunaeftirlitið til vega nýggjar læknaváttanir, sum skulu vísa, um støðan hjá tí skadda er so mikið støðug ella varandi, at avgerð kann takast um endurgjald fyri varandi mein og endurgjald fyri mist vinnuføri, sí 2 og 3 omanfyri.

Vanlukkutryggingarráðið skal taka avgerð í málum innan fyri tvey ár. Freistin er lógarásett. Í ávísum førum kann tað verða neyðugt at taka eina fyribils avgerð, um ikki er møguligt at halda ásettu freistina.

## Kærumøguleiki

Avgerðir, sum Vanlukkutryggingarráðið tekur, kunnu – við nøkrum avmarkingum – tann skaddi, hansara avvarðandi, viðkomandi arbeiðsgevari, sjálvstøðugt vinnurekandi, viðkomandi tryggingarfelag, landið og Vinnusjúkugrunnurin kæra til danska Ankestyrelsen.

Áðrenn Ankestyrelsen viðger eina kæru eftir stk. 2, skal Vanlukkutryggingarráðið taka støðu til, um grundarlag er fyri at geva kæraranum heilt ella partvíst viðhald. Kæran skal tí sendast Vanlukkutryggingarráðnum.

Kann Vanlukkutryggingarráðið ikki geva kæraranum viðhald, verður kæran send víðari til Ankestyrelsen við grundgevingini hjá Vanlukkutryggingarráðnum fyri avgerðini og endurmetingini.

Kærufreistin er tríggir mánaðir frá tí degi, tú móttekur avgerðina hjá ráðnum. Ráðið syrgir fyri, at málsskjølini verða týdd til danskt, og at skjalatilfarið síðani verður sent til Ankestyrelsen. ■

> „Tað er sera týdningarmikið, at Vanlukkutryggingarráðið fær fráboðan um skaðan, tí annars hendir einki."



# Vitjan á arbeiðs-plássum *kring landið*

**Starvsfelagið vitjar við jøvnum millumbili limir sínar úti á teirra arbeiðsplássum kring landið. Endamálið er, at vit kunnu seta andlit á limirnar og tey á okkum, og at limir fáa tættari samband við felagið.**

**Í 2022 vitjaðu** vit limir á 19 arbeiðs-plássum í Norðoyggjum, Eysturoynni, Vágum og Norðstreymoy.

**Í 2023 vitjaðu** vit limir á 23 arbeiðsplássum í Havn og í Suðuroy.









## Myndafrásøgn

**20. september í Havn:** Taks, Tjóðsavnið, Almannaverkið og Kringvarpið.





**31. mai í Havn:** Rúsdrekkasølan, Bústaðir, Tórshavnar Havn, Ellisheimið og Tórshavnar kommuna.









**10. mai í Havn:** Posta, Landfútin, Heilsufrøðiliga starvsstovan og Tjaldurs Apotek.



**8. november í Havn:** Akstovan, Havstovan, Vørn og læknaskrivarar og umsiting á Landssjúkrahúsinum.

**Vit bóðu álitis-fólkini** senda okkum spurningar frá limunum innan vitjanina. Tað komu fleiri spurningar inn, sum so varð greitt frá á vitjanunum.

Ætlanin er at vitja nakrar stovnar afturat í Havn og í Sandoynni í 2024.

Myndafrásøgn



14. og 15. november í Suðuroy: Manningin á Smyrli, Tvøroyrar kommuna, Strandferðslan, Taks, Vágs kommuna og Suðuroyar Sjúkrahús.













# Tryggingarfelagið LÍV í 2023

**Limirnir í Starvsfelagnum** hava sínar tryggingar í P/F Tryggingarfelagnum LÍV, sum Starvsfelagið eisini er partaeigari í. Limirnir hava bæði eftirlønaruppsparingina, tryggingar við deyða, hjúnafelagstrygging, trygging fyri ávísar hættisligur sjúkur og trygging í sambandi við hoyritól.

**Í 2023 hava vit sæð fylgjurnar av russiska álopinum á Ukraina í 2022. Eftir ógvisligu skjálvtarnar á fíggjarmarknaðinum í 2022 hevur støðan rættað seg nakað aftur í 2023.**



PARTABRØVINI hava klárað seg væl, og renturnar hækkaðu ógvisliga í 2022 og fyrstu 9-10 mánaðirnar av 2023. Í november og desember eru greiðar ábendingar um, at inflatiónin er lækkandi, og tað hevur fingið renturnar at lækka lutfalsliga nógv seinastu tveir mánaðirnar av 2023. Hetta hevur havt við sær, at eisini lánsbrøvini hava klárað seg lutfalsliga væl í 2023.

Niðast til høgru sæst avkastið, viðskiftafólkini við marknaðarrentu hjá P/F Tryggingarfelagnum LÍV hava fingið fram til 30. november 2023

Í skrivandi støðu er avkastið fyri desember ikki uppgjørt. Alt talar fyri, at desembermánaður hevur háttað sær positivt, so væntandi hevur ársins seinasti mánaður eisini háttað sær jaliga fyri viðskiftafólkini. Tað fegnast felagið um eftir eitt hart og avbjóðandi 2022.

Rakstrarúrslitið hjá P/F Tryggingarfelagnum fyrstu 9 mánaðirnar av 2023 var 24, 2 mió. kr. í yvirskoti eftir skatt. Í 2023 bleiv avgerð tikin um at byggja nýtt høvuðsæti til LÍV. Eftir ætlan verður flutt frá Kopargøtu til Óðinshædd um árskiftið 2025/26.

## Samhaldsfesti loysir seg

Seinnu árini hevur tilgongdin av nýggjum kundum verið vaksandi, og tað sama ger seg galdandi fyri samlaða inngjaldið til LÍV.

Økta kundatilgongdin, har fleiri herðar eru til at bera skyldurnar, hevur gjørt tað møguligt áhaldandi at minka kostnaðin at reka LÍV. Góða gongdin á kundasíðuni hevur lagt lunnar undir áhaldandi at minka umsitingarkostnaðin hjá kundunum við marknaðarrentu (LÍV Pensjón).

Fyri 2024 hevur nevndin tikið støðu til m.a. at minka hesar umsitingarkostnaðir:

a. Umsitingarprosentið verður minkað enn eina ferð úr 4% niður í 3% av árliga inngjaldinum

b. Árligi fasti kostnaðurin verður minkaður úr 180 niður á 150 kr.

At felagið kann minka umsitingarkostnaðin er tongt at, at fleiri herðar eru til at bera samlaðu byrðarnar. Tí fegnast felagið um at kunna bera kundunum part av hesum aftur við minni umsitingarkostnaði. Minkaði umsitingarkostnaðurin økir um samlaðu eftirlønaruppsparingina hjá viðskiftafólkunum.

Viðskiftafólkini hava møguleika at síggja síni eftirlønar- og tryggingarviðurskifti á kundaportalinum (Mítt LÍV), sum er at finna á heimasíðuni www.liv.fo. Kundaportalurin bleiv dagførdur síðst í 2023, so at nú eisini ber til at fáa eina forsøgn yvir mett útgjald við 67 ára aldur. Við útgangsstøði í hesum ber til at fáa eina meting av búskaparligu støðuni hjá tí einstaka viðskiftafólkinum, tá ið farið verður av arbeiðsmarknaðinum. Kundaportalurin verður dagførdur so hvørt.

## Leigubústaðir og grøn orka

Felagið ætlar áhaldandi, at partur av eftirlønaruppsparingini hjá felagnum arbeiðir í Føroyum. Íløguparturin í føroyska samfelagnum er øktur seinnu árini. Í 2023 gjørdi felagið samstarvsavtalu við Bústaðir um at byggja 22 leigubústaðir. Flutt verður inn í hesar bústaðir í februar/mars 2024. LÍV fegnast um hetta samstarv og arbeiðir áhaldandi við fleiri verkætlanum á bústaðarøkinum. Vónandi verða fleiri byggiverkætlanir sjósettar í 2024.

Vindmyllurnar, felagið gjørdi íløgur í saman við MAGN, eru í 2023 farnar at framleiða grøna orku til føroyska húsarhaldið við fullari styrki. Felagið fegnast um at verða partur av loysnini á grøna økinum bæði í Føroyum og í altjóða verkætlanum.

Í 2023 keypti P/F Fakfelag, har Starvsfelagið er ein av partaeigarunum, restina av partapeninginum í P/F Tryggingarfelagnum LÍV frá Føroya Landsstýri. Hetta bleiv gjørt trý ár áðrenn upprunaligu ætlanini. Hetta hevur við sær, at tað nú eru tveir partaeigarar í P/F Tryggingarfelagnum LÍV: P/F Fakfelag og Ognarfelagið LÍV við hvør sínum 50% í ognarskapi.

*LÍV takkar Starvsfelagnum og limum tess fyri ta álit, tit hava sýnt okkum.*

**Avkast fyri ymisku váðabólkarnar við marknaðarrentu**

| | Við 15 árum til eftirlønaraldur | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Mánaðar:** | **Varin** | **Miðal** | **Høgur** | **Partabrøv** | **LÍV konta** |
| Januar | 1,76% | 2,79% | 3,82% | 6,14% | 0,76% |
| Februar | -0,82% | -0,83% | -0,83% | -1,18% | -0,82% |
| Mars | 0,63% | 0,64% | 0,66% | 0,68% | 0,55% |
| Apríl | -0,11% | -0,20% | -0,30% | -0,80% | -0,10% |
| Mai | 0,10% | 0,46% | 0,82% | 1,57% | -0,11% |
| Juni | 1,10% | 1,77% | 2,43% | 3,34% | 0,53% |
| Juli | 0,61% | 0,86% | 1,10% | 1,57% | 0,43% |
| August | -0,53% | -0,81% | -1,08% | -1,82% | -0,33% |
| September | -0,87% | -1,13% | -1,40% | -2,49% | -0,90% |
| Oktober | -0,90% | -1,76% | -2,61% | -4,19% | -0,65% |
| November | 2,43% | 3,35% | 4,26% | 6,40% | 2,02% |
| **Higartil í ár** | **3,41%** | **5,12%** | **6,83%** | **8,99%** | **1,27%** |



Sofaprát um førleikamenning á álitisfólkadegnum 27. novembur 2023: Dánjal Højgaard (uttast til vinstru) var orðstýrari og sofurnar vóru mannaðar av umboðum frá almennu partafeløgunum, almennu og kommunalu arbeiðsgevarunum. Frá vinstru á sofunum: Bára Gásadal, starvsfólkastjóri á Føroya Tele, Bára á Lag, marknaðar- og HR leiðari á Posta, Súni Selfoss, formaður í Starvsfelagnum, Anita Fuglø, leiðari í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum, og Jan Mortensen, stjóri á lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum.

# Álitisfólka-fundir 2023

## Fyrri árligi álitisfólkafundurin

Starvsfelagið skipaði fyri tí fyrra árliga álitisfólkafundinum 2. oktober í Smæruni. Á leið 70 álitisfólk luttóku.

Á skránni: Kanningin um happing, ið vit hava gjørt saman við Gallup Føroyar og Katrin av Kák sálarfrøðingi, varð framløgd á fyrsta sinni. Orsøkin til, at fyrri fundurin ikki varð hildin fyrr enn nú, var, at vit vildu fáa úrslitið av kanningini við til henda fundin.

Greitt varð frá, hvat orsøkin er til, at vit hava valt at gjørt hesa kanningina millum limir okkara. Laila Hentze frá Gallup Føroyar legði úrslitini fram. Katrin av Kák, sálarfrøðingur, greiddi frá fyribrigdinum happing, og hvørjar sálarligar fylgjur kunnu standast av happing.

Næsta evnið á skránni var Umhvørvið – hvat gera vit?

Súni Selfoss vísti á týdningin at seta fokus á umhvørvið, og hvat vit hava gjørt fyri at verða meiri umhvørvisvinarlig. Síðan greiddu Kári Mortensen, Rúna Hjelm og Fía Norðberg Niclasen frá Umhvørvisstovuni frá orkuloysnum, endurnýtslu og grønum átøkum á stovninum.

Til seinast greiddu Súni Selfoss, formaður, og Anna Johannesen frá uppskotinum til nýggja lønartalvu, ið brýtur frá teimum lønartalvunum, ið vit kenna í dag.

## Seinni árligi álitisfólkafundurin

Seinni árligi fundurin varð hildin 27. november, eisini í Smæruni. Á leið 80 álitisfólk luttóku.

Súni Selfoss beyð vælkomin. Beinta Simonsen, samskiftisfólk, greiddi í stuttum frá, hvat stóð í tilfarinum, ið var býtt út til álitisfólkini.

Dánjal Højgaard, løgfrøðingur, greiddi frá leiklutinum sum álitisfólk, soleiðis at tey nývaldu álitisfólkini kunnu vera nakað útgjørd til álitisfólkauppgávuna, inntil tey fáa í boði at koma á álitisfólkaskeið á vári og á heysti 2024.



Vit høvdu evnið um førleikamenning sum høvuðsevni til hendan fundin.

Dánjal Højgaard greiddi í stuttum frá ásetingini í sáttmálanum við Fíggjarmálaráðið (FMR) og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið (KAF) um førleikamenning.

Diana Gilstón, deildarleiðari á Taks, greiddi frá, hvussu tey á Taks hava útint stategiska førleikamenning í verki fyri starvsfólkini har.

Finn Jensen, dekanur fyri hægri nám á Glasi, greiddi frá, hvørji førleikamennandi tilboð eru á Glasi.

Guðrið Joensen, samskipari, greiddi frá úrslitinum av kanningini millum limir okkara á sáttmálaøkinum við FMR og KAF.

Aftaná var skipað fyri sofapráti við Súna Selfoss, formanni Starvsfelagsins, Jan Mortensen, stóra á Lønardeildini í FMR, Anitu Fuglø, leiðara á KAF, Báru Gásadal, HR-fólk á Føroya Tele, og Báru á Lag, HR-fólk á Posta. Dánjal Højgaard leiddi sofaprátið. Tosað var um úrslitið av kanningini, og hvat kann gerast fyri at fáa førleikamenningina setta í verk á stovnunum.

Seinast á skránni var Heri Joensen frá Lóðri, hann tók saman um kanningina um happing, ið vit gjørdu í september/oktober. Hann samanbar hesa við aðrar kanningar og vísti á, hvørja ávirkan happing hevur á fólk. ■

> „Súni Selfoss vísti á týdningin at seta fokus á umhvørvið, og hvat vit hava gjørt fyri at verða meiri umhvørvisvinarlig."

Dánjal Højgaard, løgfrøðingur, leggur fram um førleikamenning





## ATGONGUMERKI TIL FESTIVALAR

**Í fleiri ár hava vit bjóðað okkara limum at keypa atgongumerki til G! festivalin og Summarfestivalin fyri serprís, og hetta tilboðið hevur verið nógv brúkt millum limir okkara. Tí hava vit valt at bjóða hetta aftur í ár.**

**Fram til 12. mars** kunnu limir í Starvsfelagnum keypa atgongumerki til Summarfestivalin fyri 875 kr. og til G! festivalin fyri 995 kr. Tað ber einans til at keypa eitt atgongumerki til hvønn lim. Allir limir hava fingið teldupost um tilboðið, og hvussu farast skal fram. Hevur tú ikki fingið teldupostin, ber til at seta teg í samband við felagið.

Eftir 12. mars ber ikki til at fáa atgongumerki til serprís frá Starvsfelagnum. Limirnir fáa boð við telduposti, um avtalur verða gjørdar við aðrar tónleikafestivalar.







# Tiltak um fakfeløg, bústaðir og umhvørvið á Reinsarínum

Myndir: **Gwenael Akira Helmsdal Carré**

**STARVSFELAGIÐ** skipaði saman við hinum fakfeløgunum í Fakfelagssamstarvinum fyri forvitnisligum tiltaki á Reinsarínum 27. mai í fjør. Ætlanin við tiltakinum var at varpa ljós á tveir umfatandi samfelagstrupulleikar, sum ávirka nógv, nevniliga bústaðarneyð og umhvørviskreppuna. Hesar trupulleikar vildu vit seta í samband við fakfeløg við at spyrja, hvønn leiklut fakfeløgini hava í hesum trupulleikunum við umhvørviskreppuni og bústaðarneyðini.

Í londunum kring okkum eru fakfeløgini virkin á hesum økjum, eitt nú byggja summi fakfeløg í Íslandi leigubústaðir til limir sínar. Og í Svøríki verða t.d. ásetingar gjørdar í sáttmálarnar undir samráðingum, sum binda partarnar at gera átøk fyri at minka um umhvørvisárin. Hóast hetta eru føroysk fakfeløg ikki virkin á hesum økjunum á sama hátt.

Vit bjóðaðu umboðum úr áhugabólkum, vinnulívi og fakfeløgum til sofaprát um bústaðir og umhvørvið fyri at spyrja tey meira um tað. Eisini vóru innsløg við tónleiki og skemti frá Páll Oddi Rubeksen, RSP og Jákup Veyhe, umframt at Marita Rasmussen, stjóri á Havstovuni og fyrrverandi stjóri í Vinnuhúsinum, røddi.

Í sofaprátinum um umhvørviskreppuna luttóku Elsa Berg frá felagsskapinum Veðurlagslóg NÚ, Birita Fritleifsdóttir Kjærbæk, starvsfólk á Umhvørvisstovuni og næstforkvinna í Starvsfelagnum, og Jógvan Philbrow, formaður í Føroya Pedagogfelag. Dánjal Højgaard var orðstýrari.

Hóast øll vóru samd um, at umhvørvið er okkara felags ábyrgd sum samfelag, varð spurningurin settur, um tað var uppgávan hjá einum fakfelagi at stríðast fyri umhvørvinum, tá ið fremsta uppgávan hjá fakfeløgunum er at stríðast fyri betri løn og kor til limir sínar. Kjakið gekk væl, og eisini fingu áskoðarar í rúminum møguleika at seta spurningar til teirra, ið sótu í sofunum.

Eftir prátið vórðu luttakararnir skiftir út til næsta sofaprát um bústaðarneyðina. Her luttóku Jan Jakobsen, stjóri í LÍV, Elin Hentze umboðandi áhugafelagið Búgva, ið arbeiðir fyri fjølbroyttari bústaðarmøguleikum í Føroyum, Súni Selfoss, formaður í Starvsfelagnum og nevndarlimur í LÍV, og Páll Nolsøe, formaður í Akademikarafelag Føroya.

Stjórin í LÍV var boðin við til prátið, tí at fakfeløgini í Føroyum eiga ognarlutin í felagnum. Felagið hevur eisini gjørt avtalu við Bústaðir um felags verkætlan at byggja leigubústaðir í Havn. Hóast fakfeløg í øðrum norðurlondum byggja leigubústaðir til sínar limir, varð tað ført fram, at tey føroysku fakfeløgini ikki hava fíggjarligu orkuna til at gera tað sama. Tí varð verkætlanin hjá LÍV nevnd sum ein góð loysn, tí fakfeløgini kunnu tá í felag fíggja bústaðarbygging við eftirlønaruppsparingunum hjá limum sínum.

framhald ///





„Ætlanin við tiltakinum var at varpa ljós á tveir umfatandi samfelagstrupulleikar, sum ávirka nógv, nevniliga bústaðarneyð og umhvørviskreppuna“













Luttakararnir tóku væl ímóti verkætlanini hjá LÍV og Bústøðum og hildu, at tað er gleðiligt, at ein størri partur av íløgunum hjá LÍV verður nýttur í Føroyum heldur enn uttanlands. Men hóast hetta vóru tey samd um, at ein verkætlan ikki er nóg mikið, og vónin er, at LÍV fer at gera uppaftur fleiri samstørv við Bústøðum um byggiverkætlanir.

Samanumtikið var kvøldið væleydnað við nógvum góðum práti, kjaki og undirhaldi. Ætlanin er at hava onnur tiltøk seinni, sum seta sjóneykuna á ymisk samfelagssviðurskifti, sum ávirka limir okkara. ■

## SJAVSKAPPING

**Starvsfelagið skipaði á øðrum sinni fyri sjavskapping í felagshølunum hóskvøldini 26. oktobur 2023 og 25. januar 2024.**

**Vit hildu, at undirtøkan** var so mikið góð til fyrstu sjavskappingina í januar 2023, at vit skuldu hava tvær kappingar um árið.

Ávikavist 16 og 14 lið høvdu teknað seg til báðar kappingarnar. Tað eru limir við makkara, ið ikki nýtist at vera limur í felagnum.

Kappingin varð skipað í tveimum bólkum, og vinnaraliðið úr hvørjum bólki kom í finaluna. Nummar tvey úr hvørjum bólki spældu um triðja og fjórða plássið.

Vinnarar av sjavskappingini í oktobur gjørdust Tummas Johannesen og Tróndur Tummasarson Johannesen, og í januar Liss á Fjallinum og Magnus Lamhauge. Tey fingu umframt heiðursbræv hvør sítt gávukort upp á 1.000 kr. frá Atlantic Airways. Nummar tvey og trý fingu gávukort upp á ávikavis 500 kr. og 300 kr. frá FK. Nummar fýra í kappingunum fingu hvør sín ryggsekk.







## NTR (NORDISK TJENESTEMANNS RÅD)

**Starvsfelagið** er við í tveimum norðurlendskum samstørvum við okkara „systur„feløg í Norðurlondum. Í NTR eru fakfeløg, ið hava kommunalt settar limir.

NTR skipar vanliga fyri ráðstevnu annaðhvørt ár. Í 2023 varð ráðstevnan hildin í Reykjavík í Íslandi 25.-27. juni.

Evnið var: „Frá kreppu til organisering – samleikin hjá fakfelagsrørsluni í okkara tíð?" – Hvussu ávirka kreppur, so sum kríggj í Evropa, inflatión og umhvørvið fakfeløg og teirra samleika".

Á ráðstevnuni vóru fyrilestrar og smærri verkstovur um evnið.

Verkstovurnar høvdu hesi evni:

- Klimaændringer – fagforeningens rolle
- Fagbevægelsens udfordringer med den faldende organisering
- Erfaringer med Barentssamarbejdet – fra den kolde krig – fred og krig – hvordan påvirkede det folk-til-folk samarbejdet?
- Ligestilling i krisetider
- De økonomiske krisescenarier – hvad kan vi forvente?

Verkstovuna um økonomiske krisescenarier hevði Jan Otto Holm, búskaparráðgevi, hann greiddi frá inflatiónini, vit eru í, og hvørji útlit kunnu væntast, og hvussu vit skulu reagera upp á støðuna.

Til seinast á ráðstevnuni góvu øll forfólkini frá luttakandi feløgunum í NTR váttan um, at áðenn vit møtast aftur í samstarvinum, skulu vit halda fram við at granska í teimum evnum, ið vit kjakaðust um á ráðstevnuni í Reykjavík.




Myndir: setur.fo

# Anna er ÁRSINS álitisfólk

**Anna Tórgarð, sum starvast sum próvbókasamskipari á Fróðskaparsetri Føroya, varð kosin til ársins álitisfólk á aðalfundi felagsins 4. mars 2023.**

Anna fekk umframt eina gávu frá felagnum eisini heiðursbræv við hesi grundgevingini:

*Anna fær heiðurin sum Ársins Álitisfólk 2023 fyri arbeiði sítt á Fróðskaparsetri Føroya. Um Annu kann sigast, at hon er álitisvekjandi, rólig og innbjóðandi at tosa við. Hon hevur við støðufesti vart limir felagsins, og er siðilig og diplomatisk mótvegis leiðsluni. Fyri hetta heldur nevndin, at Anna hevur uppiborð viðurkenningina sum Ársins álitisfólk.*

Í samrøðu, sum kann lesast á setur.fo, sigur Anna, at hon er glað fyri viðurkenningina, og hetta gevur henni hug og áræði til at halda fram eitt sindur afturat.

– Gleðin kemur tær ferðirnar, ið eg føli, at ein ikki góð støða hjá einum starvsfelaga broytist til at vera ókey. Annars eri eg meira leitandi alla tíðina, ivist altíð í, um ein spurningur ella trupulleiki ikki kundi verið betur avgreiddur. Tá ið álitisfólk kemur upp í onkur viðurskifti millum starvsfólk og leiðslu, er tað ofta blivið trupult, og tá er ikki longur bara ein spurningur um at hyggja í lógir og reglur. Tí tað mesta duga starvsfelagar sjálvir at fáa greiðu á, sigur hon.

Spurd um, hvat uppskriftin til at vera eitt gott álitisfólk er, svarar Anna, at tað er avgerandi at lurta væl. Tá ið ein starvsfelagi hevur onkran spurning ella trupulleika, er týdningarmikið at lurta væl og royna at finna grundina til tað, sum órógvar.

– Tú mást viðurkenna kenslurnar, men tó ikki lata tær stýra. Eg haldi, at álitisfólkið má royna at hyggja róliga at støðuni og minnast til, at tað umboðar starvsfelagan. Og samstundis má ein royna at samstarva við leiðsluna, sigur Anna Tórgarð.

Áhugin fyri fakfelagsarbeiðnum kemur ikki frá fremmandum, greiðir Anna frá.

– Mamma mín sat í nevndini í Havnar Arbeiðskvinnufelag um tað mundið, tá ið víðagitna Andrea Árting legði frá sær síðst í 70'unum. Heita evnið tá var líkaløn fyri kvinnur og menn, og tá kveiktist mín áhugi fyri fakfelagsarbeiði av álvara. Eg sat sjálv í somu nevndini eitt stutt skifti tíðliga í 80'unum, og eisini arbeiddi eg sum skrivstovufólk í Havnar Arneiðskvinnufelagi frá 1988 til 1993, sigur Anna, sum hevur verið álitisfólk á Fróðskaparsetri Føroya síðani á heysti 2018. ■

***Starvsfelagið ynskir Annu hjartaliga til lukku við uppibornа heiðrinum og takkar henni fyri alt arbeiðið, ið hon ger fyri felagið.***

## NSO (NORDISKE STATSTJENESTEMENNS ORGANISATION)

**NSO er norðurlendskur felagsskapur fyri fakfeløg í almenna geiranum í Norðurlondum. Svøríki hevur havt formansskapin seinastu tvey árini.**

**Virksemið í 2023** var í høvuðsheitum at leggja ráðstevnuna til rættis, sum hesa ferð var í Arild, sum liggur í Skåne í Svøríki, í døgunum frá 28. til 30. august.

Evnini, sum ráðstevnan viðgjørdi, vóru avbjóðingarnar í sambandi við alheims veðurlagsbroytingarnar, trygdarpolitiska støðan í kjalarvørrinum av krígnum í Ukraina, og til seinast hvør týdningurin er av Vitlíki AI.

Fakfeløgini kunnu verða við til at tryggja, at veðurlagsátøkini, sum verða sett í verk, skulu vera rættvís, soleiðis at tey ikki raka tey við minstu inntøkunum harðast, men at tað verða tær breiðastu herðarnar, sum bera tyngstu byrðuna.

Her eru norðurlendsku fakfeløgini í tí hepnu støðu, at tey við trípartasamstarvi og gjøgnum sáttmálar hava møguleikar at ávirka arbeiðsmarknaðin, so veðurlagsátøkini verða rættvís.

Trygdarpolitiska støðan er undir støðugum trýsti og kann fara at ávirka arbeiðspláss og starvsfólk, tí tað verður eitt vaksandi krav til almennu myndugleikarnar um raðfesting og samskipan. Spenta støðan hevur elvt til, at londini eru farin at dubba seg. Tey hava økt um hernaðarligu tilbúgvingina, og samstundis verða sivil trygdartiltøk fyrireikað, sum skulu verja samfeløgini móti spinonasju, sabotasju og álopum á viðkvæmar samfelagsskipanir, undirstøðukervi, samskifti og fíggjarkervið.

Komandi tvey árini hevur Finnland formansskapin, og næsta ráðstevna verður í Finnlandi.





# Starvsfelagið í samhugaverkfalli

**Starvsfelagið vísti sín dygga stuðul til Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar við at lýsa samhugaverkfall, eftir at felagið hevði verið í verkfalli í nærum fimm vikur. Sama gjørdu rættiliga nógv onnur fakfeløg, sum enn eina ferð vístu, at tá ið á stendur, standa flestu okkara saman.**

„Vit løgdu trýst á politisku skipanina og vístu, at fakfeløgini hava eina megnar styrki, um tað er styrki, vit skulu vísa. Tá ið á stendur, standa flestu fakfeløgini saman.“

▲ Umboð fyri fakfeløgini á veg út í Tinganes at handa landsstýriskvinnuni í Fíggjarmálaráðnum, Ruth Vang, mótmælisskriv 31. oktobur 2023, tveir dagar áðrenn Starvsfelagið boðaði frá samhugaverkfallinum. Mynd: Bjarni Á. Rubeksen

**SAMHUGAVERKFALLIÐ** var galdandi fyri alt sáttmálaøkið undir Fíggjarmálaráðnum frá á midnátt 2. novembur til á midnátt 3. novembur.

Undantøk vóru beinanvegin gjørd fyri vaktsentralarnar á sjúkrahúsunum, bráðfeingistúrar við sjúkrabili umframt skipini hjá Strandferðsluskipum Landsins, sum sambært §46a í sáttmálanum við fíggjarmálaráðið hava ásetingar um sigling undir arbeiðssteðgi.

Fakfeløgini vistu væl, at mótparturin helst fór at leggja samhugaverkfallið fyri Fasta Gerðarrætt við kravinum um, at stríðsstigið var óheimilað stríðsstig. Og vit vistu eisini væl, at møguleikin fyri, at mótparturin fekk viðhald, avgjørt var har. Men vit vildu kortini royna samhugaverkfalli, og taka eitt møguligt rættarmál í Fasta Gerðarrætti.

## Fasti Gerðarrættur boðsendur

Tíðliga um morgunin tann 3. novembur, tá ið samhugaverkfallið hevði verið í gongd í nakrar tímar, komu boð frá Fasta Gerðarrætti um, at lønardeildin hjá Fíggjarmálaráðnum hevði lagt málið fyri Fasta Gerðarrætt sum skundmál. Tað vil siga, at Fasti Gerðarrættur skal taka málið upp skjótast gjørligt ella innan 24 tímar. Rættarfundurin var settur kl. 11.30.

Fíggjarmálaráðið kravdi, at Starvsfelagið skuldi viðurkenna, at dagsins samhugaverkfall var eitt óheimilað stríðsstig, tí tað ikki varð fráboðað minst 48 tímar frammanundan. Fíggjarmálaráðið førdi fram, at talan var um brot á avtaluna um fráboðanarform og fráboðanarfreist, sum ásetur, at verkfall skal fráboðast minst 48 tímar frammanundan.

Starvsfelagið kravdi frídøming og gjørdi galdandi, at avtalan um fráboðanarform og fráboðanarfreist má metast sum at vera sett úr gildi. Tá ið landsstýrið legði uppskot fyri tingið um at lóggeva um undantøk hjá sjúkrarøktarfrøðingunum, var hetta at tvinga undantøk inn í avtaluna um fráboðanarform og fráboðanarfreist – hóast partarnir í avtaluni nevnliga ikki hava avtalað undantøk við samráðingarborðið. Hetta mettu vit verða grovt mishald á avtaluna frá Fíggjarmálaráðsins síðu. Starvsfelagið hevði tí alla orsøk at vænta, at Fíggjarmálaráðið eisini fer at mishalda avtaluna við okkum – serliga partin um undantøkini. Og tí mettu vit, at hetta gav Starvsfelagnum rætt til at síggja burtur frá avtaluni og at meta hana sum ógyldaða.

Á sjálvum rættarfundinum greiddi eg Fasta Gerðarætti frá, at neyðugt var at reagera beinanvegin við einum samhugaverkfalli fyri at vísa, at Starvsfelagið ikki góðtekur, at sáttmálaparturin brýtur avtaluna ella vísir, at tey halda seg kunna bróta hana. Um Starvsfelagið góðtók hetta, var tað ein viðurkenning av, at tað, sum partarnir avtala, einki hevur at siga, og at landsstýrið altíð kann lóggeva beint ímóti sínum avtalum. Hvat er so meiningin við Starvsfelagnum? Og hví gjalda limagjald?

Við lógaruppskotinum um at lóggeva undantøk fyri verkfallið hjá Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar er talan sostatt um eina støðu, sum kundi hótta tilverugrundarlagið hjá Starvsfelagnum.

## Niðurstøðan hjá Fasta Gerðarrætti

Fasti Gerðarrættur gav Fíggjarmálaráðnum viðhald og staðfesti, at samhugaverkfallið var eitt óheimilað stríðsstig, tí tað ikki var fráboðað í minsta lagi 48 tímar frammanundan.

Samhugaverkfallið varð tískil avblást uml. kl. 14.45 seinnapartin henda dagin.

## Endamálið rokkið

Nevndin metir, at endamálið við samhugaverkfallinum varð rokkið.

Vit løgdu trýst á politisku skipanina og vístu, at fakfeløgini hava eina megnar styrki, um tað er styrki, vit skulu vísa. Tá ið á stendur, standa flestu fakfeløgini saman.

Vit fingu eisini staðfest, at Fíggjarmálaráðið fírir ikki fyri at (mis)brúka sína serstøðu sum sáttmálapartur og politiskt stýrandi og uttan at smæðast fær Føroya Løgting at leggja upp í eina konflikt, um tey ikki fáa sín vilja.

Hetta kunnu vit ikki og fara ongantíð at góðtaka, og tí fara vit eisini í eini aðrari líknandi støðu at gera okkara til, at hetta ikki endurtekur seg.

Fakfeløgini fingu boðskapin væl fram, við tað at alt landið henda fríggjadagin varð lagt stilt. ■

# 37 tíma arbeiðsvika

## – trípartasamráðið – hvat nú?

**Lógaruppskotið um at stytta arbeiðsvikuna til 37 tímar varð ikki lagt fyri tingið síðsta heyst, sum landsstýrið ætlaði, og tað er sera harmiligt. Men eg havi ikki mist vónina um, at arbeiðsvikan verður stytt við lóg.**

„At vit eru komin so langt, sum vit eru, er at takka fakfeløgunum fyri. Seinastu árini hava vit javnt og samt víst á tað neyðuga í at stytta arbeiðsvikuna"




AT VIT ERU KOMIN so langt, sum vit eru, er at takka fakfeløgunum fyri. Seinastu árini hava vit javnt og samt víst á tað neyðuga í at stytta arbeiðsvikuna, so at vit eru kappingarfør um arbeiðsmegina og eru á sama støði viðvíkandi arbeiðstíð sum grannalond okkara, sum vit vanliga sammeta okkum við.

Starvsfelagið setti til løgtingsvalið í 2019 sum fyrsta fakfelagið stytta arbeiðsviku á listan yvir kjarnumál, sum felagið skuldi arbeiða við í tí valskeiðinum, men undirtøka var á ongan hátt í politisku skipanini. Hví so var tá, skal eg ikki koma so nógv inn á nú, men ræðusøgurnar frá teimum, ið ikki hildu hetta vera gott hugskot, vóru nógvar og í flestu førum ikki sakligar.

Men nú eru vit tíbetur komin víðari. Stór kanning, sum átta fakfeløg stóðu aftanfyri, og sum framvegis er einasta kanning, sum alment setur tøl á kostnaðin av at stytta arbeiðvikuna, er gjørd, og vit hava fingið nýtt politiskt stýri, sum hevur stytta arbeiðsviku í samgonguskjalinum, og sum veruliga vil gera nakað við hetta stóra mál.

Eftir valið varð eitt trípartasamráð skipað, sum hevur til endamáls at finna fram til, hvussu hetta best verður gjørt. Umboðini fyri fakfelagssíðina hava júst sum arbeiðsgevarasíðan ført síni sjónarmið fram. Tá ið alt kemur til alt, er tað landsstýriskvinnan við arbeiðsmarknaðarmálum, sum hevur seinasta orðið og orðar eitt lógaruppskot, sum vónandi skjótt verður lagt fyri Føroya Løgting.



**Umboð frá Fakfelagssamstarvinum og politisku flokkarnar hittust á fundi í Runavík 25. Novembur 2022 at umrøða kjarnumálini, harímillum stytta arbeiðsviku. Frá vinstru: Borgný Mohr, Starvsfelagið, Regin Berg, sum hevur gjørt kanningina um 37 tíma arbeiðsviku, Óluva í Gong, Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, Beinir Johannesen, Fólkaflokkurin, Jógvan Philbrow, Føroya Pedagogfelag, Mary Antonsdóttir, Heilsuhjálparafelag Føroya, Jacob Eli Olsen, Føroya Lærarafelag, Páll Nolsø, Akademikarafelag Føroya, Jenis av Rana, Miðflokkurin, Sámal Petur í Grund, Sjálvstýrisflokkurin, Bárður av Steig Nielsen, Sambandsflokkurin, Ingilín D. Strøm, Javnaðarflokkurin, Høgni Hoydal, Tjóðveldi, og Vigdis Johannesen, Havnar Arbeiðskvinnufelag. Mynd: Fakfelagssamstarvið**

### Trípartasamráðið:

Tey, ið sita í trípartasamráðnum, eru:

**Vegna landsstýrið:**
- Ingilín D. Strøm, landsstýriskvinna, Pól Egholm, aðalstjóri og Astrid Reinert Øregaard, fulltrúi.

**Fyri almenna arbeiðsgevaran:**
- Jan Mortensen, stjóri á lønardeildini, og Anita Fuglø, leiðari hjá Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum.

**Fyri privata arbeiðsgevaran:**
- Niels Winther, stjóri í Vinnuhúsinum, og Kristoffur Laksá, samráðingarleiðari hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag.

**Fyri løntakarafeløgini á privata arbeiðsmarknaðinum:**
- Sonja Jógvansdóttir, samskipari hjá Samtaki, og Pætur Niclasen, formaður í Samverki

**Og fyri løntakarafeløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum:**
- Óluva í Gong, forkvinna í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, og Súni Selfoss, formaður í Starvsfelagnum.

Alfred Petersen, advokatur og fyrrverandi semingsmaður, leiðir trípartasamráðið.

### Fundarrøðin:

Fyrstu fundirnir við politisku skipanina vóru soleiðis skipaðir, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum fundaðust í hvør sínum lagi við politisku skipanina, har væntanir vórðu avstemmaðar, og hoyringssvarini blivu gjøgnumgingin.

Eftir tað hittust øll at leggja eina fundar- og tíðarætlan.

Síðan hava einir 10 fundir verið, har serfrøðin hevur verið inni eftir ynskjum frá pørtunum.

Tey, sum hava lagt fram fyri samráðnum, eru:

- **Gjaldstovan** – Durita Tausen
- **Hagstovan** – Kári Holm Johannesen
- **Landsbankin** – Malan Johansen og Kári Petersen
- **Búskaparráðið** – Fróði Magnussen,
- **Vinnuhúsið** – Jórun Gardar
- **Jan Otto S. Holm** og **Regin Berg**, sum gjørdu kanningina um 37 tíma arbeiðsviku
- **Súsanna Olsen**, stjørnmálafrøðingur, og
- **Erika Hayfield**, Ph.D. og adjunktur í samfelagsvísindum á Setrinum

### Hvat nú?

Upprunaliga var ætlanin hjá Ingilín D. Strøm, landsstýriskvinnu við arbeiðsmarknaðarmálum, at leggja uppskotið um stytting av arbeiðsvikuni fyri tingið síðsta heyst, men tað hevur av ymiskum orsøkum ikki verið møguligt, og tað haldi eg vera sera harmiligt.

Í nýggjársrøðu síni segði Aksel V. Johannesen, løgmaður, at uppskotið kemur í tingið komandi vár, men longur enn til várs kunnu vit ikki bíða.

Sjálvur havi eg, umboðandi løntakararnar á almenna arbeiðsmarknaðinum, sitið í trípartasamráðnum og havi út frá tí góða arbeiðinum, ið higartil er gjørt, grundaðar vónir um, at uppskotið frá landsstýriskvinnuni kemur í vár og verður samtykt í hesi tingsetuni. ■

## HUGNAKVØLD

**Vit skipaðu fyri okkara árliga hugnakvøldi í Starvsfelagnum fríggjakvøldið 3. november. Hetta er eitt ókeypis limatiltak, ið hevur verið væl móttikið øll árini, og í ár var einki undantak. Tað var fullteknað, væl áðrenn tilmeldingarfreistin var úti. 120 fólk møttu, og fleiri stóðu á bíðilista.**

**Byrjað varð við** góðum mati frá sp/f Oddvør Skarðhamar. Omaná var rís ala mande við mandlugávu.

Niels á Reynatúgvu stóð enn eina ferð hegnisliga fyri spurnakappingini (pub quiz), har borðini dystaðust hvørt móti øðrum. Tey við vinnandi borðið fingu steyp og hvør sín ryggsekk.

Eisini stóð Niels fyri gittarundirspælinum til felagssangin. Guðrun Sólja Jacobsen framførdi saman við Janus Kampmann nøkur løg.

Endamálið við tiltakinum er, at limir koma í felagið, og at tey fáa høvi at hugna sær saman við starvsfeløgum, øðrum limum, nevnd og umsiting felagsins.



**Súni Selfoss, formaður, handar vinnandi liðnum í spurnakappingini steypið**

# KRINGVARPIÐ skal styrkjast og ikki niðurlagast



**Í novemburmánað komu aftur ófrættakend boð um uppsagnir í Kringvarpinum, og aftur hesa ferð var orsøkin sparingar, tí tað fíggjarliga ikki hongur saman.**

**FÍGGJARLIGIR TRUPULLEIKAR** eru ikki nýggir í Kringvarpinum. Síðan sjónvarpið og útvarpið vórðu løgd saman í 2005, er talið á ársverkum á stovninum minkað úr 115 niður í 77. Uppsagnir hava verið ein afturvendandi táttur, sum hevur skrykt teppið undan familjum og ferð eftir ferð fingið grundarlagið hjá stovninum at ridla. Nógv dugnalig starvsfólk hava leitað sær aðrar leiðir.

At okkara fremsti public service stovnur kemur í slíka støðu er ørkymlandi. Tað, at stovnurin ikki hevur neyðugu játtanina til at virka, kann politiskt (mis)brúkast sum eitt kvørkratak um stýringina av stovninum, og tað er ongantíð gott.

Tað hevur alstóran týdning, at vit hava eitt sterkt og óheft kringvarp, og at stovnurin og starvsfólkini hava bestu umstøður at røkja uppgávuna sum public service stovnur, ikki minst uppgávuna sum demokratiskt eftirlit.

### Tiltøkini mugu betrast

Í hoyringssvarinum til Almanna- og mentamálaráðið hálvan desembur, tá ið uppskot varð sent til hoyringar um at prísjavna kringvarpsgjaldið, svaraði felagið millum annað soleiðis:

*„Upplýst er, at uppskotið fer at útvega Kringvarpinum 5, 3 milliónur krónur, meðan fráboðaðu sparingarnar hjá stovninum vóru 8, 2 milliónur krónur. Tær ringastu avleiðingarnar kunnu loysast, men Kringvarpinum manglar framvegis tríggjar milliónir bara fyri at halda stand.*

*Hetta fer sostatt ikki at geva nakra menning og at styrkja Kringvarp Føroya, soleiðis sum samgongan ætlar.*

*Starvsfelagið skilur, at tann ætlaða prísjavningin av kringvarpsgjaldinum á 2% fer ikki at viga upp ímóti verandi lønar- og prísvøkstri. Haldførið hjá Krigvarpinum fer at versna, og framrokningar vísa, at KVF longu frá 2025 fer at hava hall.*

*Starvsfelagið fer tí at mæla til at nýta aðra skipan til prísjavning, t.d. hana, ið verður nýtt innan almannaøkið, og sum hevði givið eina rættari og betri regulering fyri KVF.*

*Starvsfelagið fer at mæla politisku skipanini, serliga samgonguflokkunum, til at liva upp til lyftið í samgonguskjaninum um at styrkja Kringvarp Føroya. Tað verður ikki gjørt við lappaloysnum, sum bert eru lutvísar loysnir, men við loysnum, sum geva okkara felags public service stovni varandi og stabilar karmar at virka undir.*

*Vilja vit Kringvarpi Føroya væl, gera vit meira, enn hetta uppskotið mælir til."*

Hóast uppskotið var kærkomið og ein góður bati til Kringvarpið, og hetta samstundis hevði við sær, at Kringvarpið tók aftur ætlaðu uppsagnirnar, so er tað ikki nóg mikið til at tryggja framtíðina hjá hesum týdningarmikla stovni. Samgongan skal gera meira fyri Kringvarpið, um tey vilja gera álvara av lyftinum í samgonguskjalinum um, at „miðlalandslagið og Kringvarp Føroya skulu styrkjast". ■

Alt hoyringssvarið kann lesast á heimasíðu felagsins starvsfelag.fo

Mynd: Jens Kristian Vang

> „Vilja vit Kringvarpi Føroya væl, gera vit meira, enn hetta uppskotið mælir til"



## AVSLÁTTARAVTALUR

**Felagið ger javnan nýggjar avtalur við fyritøkur og handlar um avsláttur til limir felagsins. Hetta gera vit, tí vit vilja geva limum okkara møguleika at spara nakrar krónur her og har, so gerandisdagurin verður eitt sindur lættari.**

**Limir okkara** hava møguleika í løtuni at fáa avsláttur frá 37 handlum, matarstøðum, tænastum innan fyri røkt og heilsu o.s.fr.

Tær nýggjastu avsláttaravtalurnar, sum eru lagdar aftrat í 2023 og 2024, eru við Polar, Kötlum grön hárfríðkan, Fønix, Jógvan Weihe, Skatefelagið í Havn, Colorama og KBI.

Sí annars alt yvirlitið á heimasíðu okkara undir limir/limatilboð yvir fyritøkurnar, ið vit hava gjørt avtalu við. Har sært tú, hvussu nógv verður latið í avsláttri.

Limirnir eiga at hava fingið limakort sendandi frá felagnum. Tað verður víst fram, tá ið rindað verður í einari av fyritøkunum. Tað nýggjasta limakortið hevur QR-kotu. Tú tekur myndatólið í telefonini yvir kotuna, tá kemur listin við avsláttaravtalunum fram.

Um tær manglar tað nýggjasta limakortið, so er at venda tær til skrivstovu felagsins.

# Vit eru trýst

**Kostnaðarstigið í Føroyum er høgt, hetta er einki nýtt, men seinastu príshækkingarnar hava veruliga sett privatbúskapin hjá meiniga føroyinginum undir trýst – stórt trýst.**



Kostnaðurin av matvørum er ein týðandi partur av fíggjarliga trýstinum á familjurnar.
Mynd: Jens Kristian Vang

**MÁNADAGIN 8. JANUAR** kunngjørdi Hagstovan nýggja dagføring av brúkaraprístalinum pr. novembur 2023. Dagføringin vísti, at inflatiónin seinasta árið nú er 2,8%. Tað vil siga, at frá novembur 2022 til novembur 2023 eru prísir, sum brúkarin rindar fyri vanligar vørur og tænastur, hækkaðir 2,8%.

Hetta kann tykjast sum góð tíðindi, tí 2,8% er ikki ovurhonds inflatión, og henda inflatiónin liggur tætt við søguligt miðal og inflatiónsmálið hjá tjóðbankum á 2,0%. Handan talið liggur tó ein annar veruleiki, tí 2,8% sigur einans nakað um, hvussu nógv prísirnir eru hækkaðir farna árið, og ikki hvussu nógv prísirnir eru hækkaðir, síðan inflatiónin veruliga tók dik á seg í kjalarvørrinum av koronu-farsóttini. Legg eisini til merkis, at so leingi sum inflatiónin er størri enn 0, gerast vørur og tænastu meira kostnaðarmiklar.

Tað var við endan av 2020, at prísirnir veruliga fóru at hækka, tí er tað nógv meira sigandi at hyggja at príshækkingini farnu trý árini. Dagførda uppgerðin hjá Hagstovuni vísir nevnliga, at farnu trý árini eru prísirnir sum heild hækkaðir 17%. Dagføringin vísir eisini, at í sama tíðarskeiðið er eitt nú matur hækkaður 20,9%, rentuútreiðslur hækkaðar 70,8%, el hækkað 14,3% og brenniolja hækkað 87,2%.

Prísurin á vørum og tænastum er í miðal hækkaður 17% farnu trý árini, og hetta er munandi meira enn lønarhækkingarnar, sum ymisku yrkisfeløgini hava megnað at samrátt seg til undir farna lønarsamráðingarumfari. Hetta merkir, at føroyingar sum heild hava mist keypiorku.

Mista keypiorkan sæst aftur í hagtølum fyri innflutning av ymiskum vørubólkum og undirstrikar, at meinigi føroyingurin er farin at raðfesta sína nýtslu øðrvísi. Nú tað er vorðið munandi meira kostnaðarmikið at fáa gerandisdagin at hanga saman fíggjarliga, er eisini veruliga neyðugt við einari fíggjarligari umraðfesting. Meinigi føroyingurin er ikki býttari enn so.

Av tí at vanlig privat nýtsla er sera týðandi partur av føroysku bruttatjóðarúrtøkuni, kann henda umraðfesting tó hava við sær, at búskaparvøksturin verður skerdur.

Samstundis sum meinigi føroyingurin er kroystur fíggjarliga, síggja vit, at eitt nú føroysku peningastovnarnir kunngera sera góð rakstrarúrslit. Níggju teir fyrstu mánaðirnar í 2023 øktist úrslitið hjá einum av føroysku peningastovnunum til 271 mió. kr., eftir at tað var 136 mió. kr. árið fyri. Ein rættiliga stórur partur av hesum úrsliti stavar frá ómaksgjøldum, sum bankarnir ásettu, tá ið rentan var lág, fyri at varðveita góð fíggjarlig úrslit. Vildu peningastovnarnir vísa samfelagssinni, høvdu teir lækkað ómaksgjøldini. Soleiðis høvdu teir víst, at teir eisini eru til fyri kundan og ikki bert fyri eigararnar. Ein av peningastovnunum kunngjørdi herfyri, at tey lækkaðu nøkur ómaksgjøld. Alt gott um tað, men lækkingin er lítil í mun til risa hækkingarnar, ið tá vórðu gjørdar. Nú tann fyrsti peningastovnurin hevur kunngjørt lækkingar, hevði verið ein fragd at sæð eina veruliga kapping um, hvør peningastovnur kundi havt lægsta umsitingargjaldið.

> „Dagførda uppgerðin hjá Hagstovuni vísir nevnliga, at farnu trý árini eru prísirnir sum heild hækkaðir 17%.“



Sera nógv keypiorka er mist, og hon má vinnast aftur.
Mynd: Jens Kristian Vang

Landsstýrið hevur sett í verk skattalætta, men tað er eyðsæð, at stóri vinnarin av skattalættanum eru tey vælbjargaðu, tí tey, sum fáa størsta skattalættan, eru tey, sum hava eina ársinntøku millum 460.000 kr. og 600.000 kr. Vit vita væl, at ein orsøk til hetta er, at tað er trupult at geva lægru inntøkubólkunum skattalætta, tí botnfrádrátturin í landsskattinum er 65.000 kr. Hví vilja kommunurnar ikki eisini hjálpa sínum borgarum og veita skattalætta? Hetta er átrokandi, tí við mistu keypiorkuni hjá vanliga føroyinginum kann minkað privat nýtsla føra við sær truplar búskaparligar tíðir í Føroyum, og tá gerast øll taparar.

Landsstýrið kundi eisini hildið síni vallyfti og avtikið MVG av ávísum vørum. Fyri at ein slík avtøka ikki skal enda sum eykavinningur hjá handilsmanninum, soleiðis at meinigi føroyingurin ongan ágóða fær av broyting í MVG-lógini, er týdningarmikið, at príseftirlit samstundis verður sett í verk. Hetta príseftirlitið er kærkomið, tí vit hoyra áhaldandi tíðindi, sum vátta, at ein røð av vørum er alt ov kostnaðarmikil í Føroyum.

Tað kann tykjast, sum at lønarsamráðingarnar, sum vóru í heyst, góvu fleiri yrkisbólkum ovurhonds lønarhækkingar, men verða hesar lønarhækkingar sammettar við tær príshækkingar, sum eru lýstar omanfyri, megnaðu lønarhækkingarnar als ikki at halda tørn við príshækkingarnar. Hetta ber boð um, at stórt trýst verður á komandi lønarsamráðingunum, sum byrja í heyst. Sera nógv keypiorka er mist, og hon má vinnast aftur.

Í tíðindunum undan ársenda 2023 vóru daprar frásagnir um, at burðaravlopið í Føroyum er alsamt lækkandi. Sjáldan hava so fá børn verið fødd sum nú. Ein fortreyt fyri, at burðaravlopið aftur kann hækka, er, at kostnaðurin av einari familjuøking verður hildin á skynsomum stigi. Ungu familjurnar, sum eru kroystar av høgum rentuútreiðslum, høgum orkuútreiðslum og høgum matútreiðslum, hava snøgt sagt ikki ráð at fáa sær tey børnini, ið tey ynskja sær. Kemur vend ikki í, og verða ikki fleiri børn fødd, fer trýstið á landskassan at økjast munandi, tí færri og færri verða í arbeiðsførum aldri í mun til tey, sum ikki eru í arbeiðsførum aldri. Lat hetta vera eina áheitan á tey ráðandi í hesum landi um at hugsa longur fram enn til endan av hesum valskeiðnum. ■



Mynd: Jens Kristian Vang

# Starvsfelagið verður grønari

**Heimurin er í umhvørviskreppu, og tað vilja vit í Starvsfelagnum verða ein partur í at loysa. Ella siga tað eitt sindur øðrvísi: vit vilja gera okkara fyri at verja umhvørvið, har vit kunnu.**

**NEVNDIN** hevur tí seinastu árini sett alt meira fokus á, hvar felagið kann gerast meira umhvørvisvinarligt.

Ítøkiliga hava vit orðað ein umhvørvispolitikk, sum inniheldur eina visión um, at vit skulu vera førandi, tá ið talan er um burðardygt innkeyp, grøna nýtsluatferð og grøna orkunýtslu.

Mannagongd (strategi) er orðað fyri, hvat vit halda skal gerast, og hvussu vit koma hagar. Politikkir eru orðaðir um orkupolitikk, nýtslupolitikk á skrivstovunum, innkeypspolitikk, og hvussu vit seta grøna politikkin hjá felagnum í verk.



Formaðurin er farin ein túr upp á tekjuna at hyggja eftir nýggju sólpanelunum. Mynd: Jens Kristian Vang

## Sólpanel er lagt á Smæruna

Tá ið tað kemur til orkupolitikkin, eru vit komin væl áleiðis, tí nú eru sólpanel løgd oman á tekjuna her í Smæruni.

Arbeiði við at leggja panelini á tekjuna fór í gongd í desemburmánaði, og nú eru vit við til at framleiða okkara egnu streymnýtslu fyri báðar bygningarnar, Smæruna og felagshúsið. Íløgan fyri hesa verkætlanina væntast at vera vunnin inn aftur eftir umleið 12-15 árum. Skipanin hevur eina garanteraða livitíð upp á 25 ár. Sostatt kunnu vit vænta ein fíggjarligan ágóða í minsta lagi í 10 ár við umleggingini til sólorku.

## Hitaskipan

Í skrivandi løtu bíða vit eftir afturmeldingum frá veitarum um hitaskipan fyri bæði húsini. Tað, sum liggur í kortunum, er, at vit fara at bora nøkur jarðhol, so vit kunnu hita bygningarnar við jarðhita.

Nær ella um hetta verður gjørt, ber ikki til at siga beint nú, men vónandi er ikki neyðugt at bíða alt ov leingi, til greiða er á hesum.

Kostnaðin av hesi verkætlan kenna vit ikki í løtuni.

Summarhúsið í Skálavík fekk á heysti 2022 nýggja hitaskipan, tá ið vit løgdu um til jarðhita.

## Burturkast

Sum fyrr sagt frá eru vit eisini farin at skilja burturkastið í felagnum, umframt at vit eru farin í holt við at brúka endurnýtslupappír, og skrivstovulutir verða so vítt sum møguligt keyptir, sum eru gjørdir úr burðardyggum tilfari.

## Øll eiga at hava møguleikan til at leggja um

Seinastu árini hava norðurlendsku samstarvsfeløgini sett umhvørvisspurningin ovast á dagsskránna.

Eg haldi eins og tey, at tað liggur ein ávís skylda á okkum sum fakfelag at ganga á odda í stríðnum fyri at basa veðurlagskreppuni, sum allur heimurin stendur í. Vit eiga at taka kreppuna í álvara og tryggja eftirkomarum okkara ein liviligan heim.

Vit sum fakfelag skulu virka fyri, at tað gerst møguligt hjá øllum at leggja um til grøna orku. Tað skal ikki vera fíggjarliga orkan hjá tí einstaka, ið ger av, um vit hava møguleika at leggja um ella ikki. Eg síggi tað soleiðis, at tað er okkara uppgáva sum fakfelag at leggja trýst á politisku skipanini við at vísa á, at hon má og skal gera tað møguligt hjá øllum at leggja um til varandi orku.

Eg vóni, at Starvsfelagið í hesum árinum kann siga seg vera so umhvørvisvinarligt, sum vit yvirhøvur kunnu vera, og at vit harvið verða uppaftur størri partur av teimum 17 burðardyggu menningarmálunum hjá Sameindu Tjóðum.

Vit síggja avleiðingarnar av umhvørvisdálkingini allastaðni, og tí er tað okkara skylda at ganga á odda og harvið vísa á, at tað ber til at gera nakað hjá okkum sjálvum, og ikki bara peika á onnur. ■



**Sólpanel eru løgd omaná tekjuna í Smæruni, so vit kunnu framleiða okkara egnu streymnýtslu. Mynd: Jens Kristian Vang**

> „Vit sum fakfelag skulu virka fyri, at tað gerst møguligt hjá øllum at leggja um til grøna orku.“



Frá móttøku í Starvsfelagnum, tá P/F Fakfelag keyptu seinastu 16,67% av ognarlutinum í LÍV. Frá vinstru: Pætur Niclasen, Óluva í Gong, ávikavist nevndarformaður og stjóri í P/F Fakfelag, og Kristoffur Kristoffersen, sum umboðaði seljaran. Mynd: LÍV

# Kundin eigur nú 100% í ognarlutinum í LÍV

**P/F Fakfelag eigur nú 50% í ognarluti í P/F Tryggingarfelagnum LÍV.**

**31. AUGUST 2023**, júst sjey ár eftir, at P/F Fakfelag keypti 33, 33% av partapeninginum, varð keypsavtala undirskrivað um at keypa tey seinastu 16, 67%, soleiðis at P/F Fakfelag hereftir fult og heilt eigur 50% av Tryggingarfelagnum LÍV.

Tað, at 21 fakfeløg standa saman um P/F Fakfelag og ognarlutin í LÍV, er ein sólskinssøga, sum enn eina ferð vísir, at standa fakfeløgini saman, so ber væl til at tryggja limum okkara nakrar sømdir, sum vit annars ikki hava. Í hesum førinum fáa vit eina væl betri skipan enn eitt ognarfelag, sum bert hevur til endamáls at vinna sær sjálvum so stórt avkast til vinningsbýti til privatu eigararnar sum møguligt.

> „Við tað, at vit hava eitt lívstryggingarfelag, sum kundin eigur, er tað kundin, ið fær ágóðan av avkastinum."

Við tað, at vit hava eitt lívstryggingarfelag, sum kundin eigur, er tað kundin, ið fær ágóðan av avkastinum. Her verður vinningsbýtið ikki latið til nakran persón ella virki, sum hevur eittans endamál við slíkari íløgu, og tað er at tryggja sær og sínum so stórt vinningsbýti sum møguligt.

Seinastu árini, tó ikki á hvørjum ári, hevur P/F Fakfelag tó fingið vinningsbýti, hetta fyri at gjalda fyri seinastu smáu 17 prosentini, sum vit í 2016 bundu okkum til at keypa, umframt at gjalda aftur lán og útlegg, fakfeløgini veittu fyri keypið, ið tá var gjørt.

Nú er skjótt slætt borð, og tí vóni og vænti eg, at kundin fær enn meira fyri at hava tryggingar sínar í Tryggingarfelagnum LÍV, sum kundin nu eigur 100% í ognarlutinum av.

Hini 50% av partapeninginum fekk Ognarfelagið LÍV, umboðandi tryggingartakarnar, tillutaðarar frá Føroya Landsstýri í 2016, samstundis sum ognarviðurskiftini í LÍV vórðu skipað av nýggjum.

Eg fegnist um, at trý ár áðrenn 10 ára freistina eydnaðist tað okkum at keypa ognarlutin frá Føroya Landsstýri.

Tað, at vit standa saman um eina samhaldsfasta skipan hjá LÍV, sæst eisini aftur í lækkandi umsitingargjaldi, tí nevndin í P/F Tryggingarfelagnum LÍV samtykti í oktobur, at umsitingarkostnaðurin hjá kundunum við marknaðarrentu enn eina ferð skuldi lækka frá 1. januar 2024.

Fasta árliga gjaldið fer úr 180 kr. niður í 150 kr., og kostnaðarprosentið av inngjaldinum lækkar úr 4% niður í 3% av inngjaldinum.

Meira um Tryggingarfelagið LÍV kann lesast aðrastaðni í Starvsblaðnum.





# Ein umskipan av almenna geiranum má gerast við trípartasamstarvi

**Í ólavsøkurøðu síni fyri 2023 og í tilhoyrandi ískoytisparti segði Aksel V. Johannesen, løgmaður, millum annað, at tað er umráðandi at kanna møguleikarnar at umskipa almenna geiran fyri at tryggja langtíðarhaldførið. Somu ella betri tænastur skulu veitast fyri somu ella færri útreiðslur, tí vit verða støðugt færri at rinda fyri hesar tænastur.**

**SUM EG SKILJI**, er ætlanin at kanna, um almenni geirin í Føroyum virkar nóg væl sammett við onnur lond, og hesum tekur Starvsfelagið fult undir við. Eitt virkið samfelag við eini virknari landsfyrisiting eigur altíð at hugsa um at skipa raksturin á best møguligan hátt. Hetta eru jú okkara skattakrónur, og øll vilja uttan iva hava sum mest burtur úr teimum.

Landsstýrið hevur eisini ætlanir um at yvirtaka málsøki frá donsku stjórnini í komandi tíðini. Farsóttarmálsøkið varð yvirtikið á nýggjárinum, og harafturat eru sjóuppmerking og vitaverk millum tey málsøki, sum skulu yvirtakast í 2024. Ætlanir eru at yvirtaka uppaftur fleiri málsøki komandi árini, eitt nú sjórættin, flogferðslu og møguliga landslæknaembætið. Starvsfelagið tekur eisini undir við hesum ætlanum og leggur seg ikki út í politiskar avgerðir.

Mín áheitan til politisku skipanina er eins og áður, at fakfeløg, sum varða av starvsfólkum á hesum málsøkjum, ið verða yvirtikin, og har umskipan verður framd í almenna bygnaðinum, verða tikin við í tilgongdini. Hetta fyri at tryggja, at starvsfólk ikki verða verri fyri av broytingum, sum yvirtøkan og bygnaðarbroytingar fara at hava við sær.

Hóast tað vanliga verður sagt frá landsins síðu, at starvsfólk ikki skulu svíða av at verða yvirtikin, hava vit tíverri dømi um tað øvuta. Vit hava limir, sum hava fingið boð um, at tey skulu munandi niður í løn, og onnur, sum ongan lønarvøkstur skuldu hava í fleiri ár eftir yvirtøkuna. Hetta kunnu vit sjálvsagt ikki góðtaka og hava enntá verið í Fasta Gerðarrætti fyri at steðga hesum ætlanum, so okkara limir ikki svíða fyri politisku ætlanirnar hjá landinum.

Okkara ynski er, at starvsfólk og fakfeløg verða tikin við í tilgongdina frá byrjan, so at starvsfólk verða spard fyri ørkymlan, stúran og strongd av at vera í tí óvissu støðuni, sum broytingarnar í starvinum kunnu hava við sær.

Við at samstarva kunnu vit loysa trupulleikar tíðliga í tilgongdini og sleppa undan ósemjum, sum kunnu stinga seg upp.

Trípartasamstarv er eitt tað besta amboðið, vit hava í slíkum støðum, har partarnir á arbeiðsmarknaðinum seta seg saman við politiska myndugleikanum at finna langtíðarloysnir.

Bestu loysnirnar verða gjørdar við samstarvi, og tí má ein umskipan av almenna geiranum gerast við trípartasamstarvi. Vit eru klár! ■



Mynd: Jens Kristian Vang

## FAKTA UM TRÍPARTASAMRÁÐINGAR:

Ein trípartasamráðing er ein samráðing millum tríggjar partar: stjórnina (landsstýrið), fakfeløgini og arbeiðsgevaran. Samráðingarnar kunnu fara fram á fleiri stigum og vera bæði í formligum og óformligum líki. Samráðingarnar kunnu snúgva seg um einstakt tema og um tvørgangandi politiskar spurningar á arbeiðsmarknaðinum.

Trípartasamráðingar eru sprotnar úr tí sokallaða „danska modellinum" frá „Septembursemjuni" frá 1899, har tað bleiv staðfest, at arbeiðsgevarin hevur rætt til at leiða og býta arbeiði, ímeðan fakfeløgini hava rætt til at samráðast um lønar- og arbeiðsviðurskiftini hjá starvsfólkunum.

# Forfólkavalið
## 9. mars 2024

**Hóast eg eri einasta valevni hesaferð, havi eg valt at skriva eina grein, sum kanska ikki er so nógv ein valgrein, men heldur ein grein, har eg geri mær nakrar tankar um, hvat eigur at standa á mállistanum komandi ár og frameftir.**

**UM VIT Í HEILT** stuttum hyggja at teimum báðum farnu valskeiðunum, so haldi eg, at rættiliga nógv hevur verið á skránni. Nakað av hesum kunnu vit seta flugubein við sum avgreitt, og annað er, sum einki flugubein kann setast við, tí vit alla tíðina skulu fylgja við tíðini og menna okkum samsvarandi.

Tað er tí umráðandi, at vit er pro-aktiv. At vit alla tíðina hava fingurin á pulsinum og fylgja við, hvat rørist í samfelagnum og kring okkum.

Um vit hyggja eitt sindur frameftir, so er nógv at hava eyga við, viðhvørt kanska í so nógv, og tí er neyðugt at raðfesta ynskini/málini, ein hevur. Ikki tað at vit skulu seta nummar á eina raðfylgju, men heldur at hava nøkur høvuðsmál í gongd og síðani leggja nýggj afturat, so hvørt sum mál verða nádd.


Súni Selfoss
**Mynd: Jens Kristian Vang**

### Lønartalvan
Tað, ið hevur ligið ovarlaga hjá mær seinastu árini og framvegis ger tað, er ein dagførd lønartalva. Verandi lønartalva er ikki tíðarhóskandi, og tí hava vit brúk fyri eini meira tíðarhóskandi lønartalvu, sum eisini er flexiblari, rúmligari og rættvísari enn verandi lønartalva; men higartil hevur tað ikki borið á mál.

Partarnir hava í sáttmálaavtalu bundið seg til at hyggja eftir verandi lønartalvu. Uppskot er gjørt, sum partarnir í løtuni viðgera, og tí havi eg góðar vónir um, at vit røkka á mál, vónandi áðrenn verandi sáttmáli gongur út 1. oktobur 2024.

### Lønarhækking, ið munar
Sum eg aðrastaðni í blaðnum vísi á, so mugu vit til komandi sáttmálasamráðingar seta øll segl fyri at náa einum samráðingarúrsliti, sum í minsta lagi javnvigar við ógvisligu inflatiónini, sum hevur verið seinastu trý árini.

Samráðingarnar, sum hava verið millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum seinastu mánaðirnar, hava tilsamans givið eina reina lønarhækking upp á 12, 75% fyri 2022, 2023 og 2024. Men henda lønarhækking er ikki nóg mikið, um vit skulu halda stand, tá ið veruligu príshækkingarnar seinstu trý árini eru 17%. Her resta 4, 25% í bara fyri at hava javnvág. Og tá er her talan um reina lønarhækking og ikki tað, at nakað er tikið av sum kostnaður fyri onnur viðurskifti í samráðingunum.

Sáttmálasamráðingar verða í heyst við FMR og KAF, umframt FAG um ársskiftið. Tað verður ikki lætt at sita við samráðingarborðið hjá nøkrum av pørtunum, áhugamálini eru púrasta hvør síni. Arbeiðsgevaraparturin fer at gera alt, hann kann, fyri at halda aftur, ímeðan fakfelagsparturin má gera alt, hann kann, fyri at limirnir fáa sum mest aftur at verandi lønarpulju.

Eg kann sjálvandi ikki frammanundan lova nakað sum helst, men málið við lønarsamráðingum má vera, at komandi lønarhækking skal muna og í minsta lagi tryggja løntakaranum javnvág millum inntøku og útreiðslu hjá tí einstaka lønmóttakaranum.

### Príseftirlit
Trýstið á løntakaran, á familjuna, á húsarhaldini er so ovurhonds stórt, at vit á ein ella annan hátt mugu stuðla tankanum um eitt eftirlit við prísstøðinum.

Útlánsrentan hækkar, matvørukostnaðurin hækkar, og brennievnið ger tað sama.

Vit hava ikki sæð nógv til, at ómaksgjøldini hjá bankunum lækka, og tó, ein hevur boðað frá smávegis lækkingum, men hesar lækkingar eru einki í mun til hækkingarnar, ið vórðu gjørdar, tí at rentan var so lág.

Vit síggja onki til, at prísurin lækkar, sjálvt um prísurin av brennievni í grannalondunum er nærum lægri nú enn áðrenn korona.

Tekur handilsmaðurin ov nógv fyri vøruna, hann selur um diskin? Eg veit ikki, men eg haldi, at kostnaðurin fyri at reka eitt vanligt húsarhald er farin heilt til skýggja, og tí má hetta kannast, og vit mugu finna út av, hvussu alt hetta hongur saman.

Eg haldi tí, at vit eiga at stuðla uppundir, at eitt príseftirlit verður sett á stovn, sum tryggjar okkum brúkarum rættvísan kostnað fyri vøruna, vit keypa, tað veri seg lán, mat, brennievni e.a.

### Mismunarlógin
Seinastu árini hevur mismunarlógin verið minst fýra ferðir í løgtinginum, men hvørja ferð er hon antin dottin burtur ímillum tingár ella hevur ikki havt neyðugu undirtøkuna.

Eg veit ikki, hví politiska skipanin ræðist mismunarlógina so illa. Hetta er ein lóg, sum tey á ein ella annan hátt ikki hava havt dirvi ella hegni til at seta í verk, ein lóg sum tryggjar vanliga løntakaran ímóti mismuni á arbeiðsmarknaðinum vegna m.a. kyn, aldur, brek, uppruna ella kynsliga samleika.

Vit verða enn eina ferð noydd til at gera okkara fyri at fáa hesa lóg staðfesta, so vanligi løntakarin kann kenna seg tryggan í sínum arbeiði og ikki verða fyri mismuni.

### Frádráttur í skatti av fakfelagslimagjaldi
Líka síðani Starvsfelagið setti frádrátt í skatti av fakfelagslimagjaldi á dagsskránna, hava vit javnt og samt havt hetta frammi, men tað hevur ikki eydnast enn at fáa politisku skipanina við upp á tað.

Eftir mínum tykki er tað ógvuliga løgið og ikki minst órættvíst, at tað er so, tí arbeiðsgevarin hevur frádrátt í skattinum fyri sítt limagjald til sítt arbeiðsgevarafelag.

At tað er týdningarmikið fyri okkara samfelag, at arbeiðsgevarasíðan er skipað í eitt sterkt arbeiðsgevarafelag, ger tað ikki minni týdningarmikið fyri okkara samfelag, at vit hava sterka fakfelagsrørslu og væl skipaðan arbeiðsmarknað.

Komandi tíðina mugu vit seta enn meira inn fyri at fáa politisku flokkarnar at síggja virðið í, at starvsfólk eru skipað í felag, og at teir stuðla eina skipan við skattafrádrátti fyri limaskap í fakfelag.

### Trípartasamstarv
Tað frøir meg almikið, at fyribrigdið trípartasamráðing ella trípartaavtala fyri fyrstu ferð hevur fingið pláss í einum samgonguskjali.

Eg havi verið fjeppari av amboðnum „trípartaavtalur", heilt frá tí eg fyri mongum árum síðani fyrstu ferð hoyrdi um avtalur, ið vórðu gjørdar við trípartasamráðingum.

Aðrastaðni kring okkum er tað púra vanligt at gera avtalur tvørtur um politisku skipanina, arbeiðsgevarasíðuna og fakfeløgini.

Lat okkum frameftir byggja á tær fáu, men góðu, royndirnar, vit hóast alt hava, seinasta dømi er trípartasamráðið, sum nú arbeiðir við tilgongdini at seta 37 tíma arbeiðsviku í verk við lóg.

Vit skulu duga nógv betur at hava álit á, at partarnir væl kunnu gera avtalur, sum eru kjølfestar millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum. Trípartasamráðing eigur at verða púra natúrligur partur av okkara avtaluhátti til frama fyri allar partar.

### Forfólkavalið
Aðalfundur felagsins verður í Smæruni 9. mars, og nú tað bert er eitt valevni til forfólk, er tað aðalfundurin, sum skal staðfesta valið, og tí er tað mín vón, at fundarfólkið stuðlar mær í at halda fram triðja og síðsta valskeiðið. Viðtøkur felagsins siga nevniliga, at eitt forfólk bert kann sita trý samanhangandi valskeið, altso 12 ár.

Eg havi trivist serstakliga væl í starvinum og havi framvegis sama brennandi hug, áræði og vilja til at leiða felagið fýra ár afturat. Tað er fantastiskt at hava kensluna av, at tað, vit gera, ger mun til frama fyri limirnar, felagið og samfelagið annars.

*Góðan aðalfund!*

Lækkaðir umsitingarkostnaðir

# Allur ágóðin fer til tín



## Tað er vorðið enn bíligari at vera kundi í LÍV

Við miðvísum arbeiði hava vit enn einaferð megnað at lækka umsitingarkostnaðin. 1. januar 2024 fór umsitingarkostnaðurin **úr 4 prosentum** niður **í 3 prosent.** Harafturat lækkaði fasti árligi kostnaðurin **úr 180 krónum** niður **í 150 krónur.**

liv.fo

títt LÍV